20-01-2026

# Frágreiðing um musikkskúlaskipanina

**BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ**

# Frágreiðing um musikkskúlaskipanina

## Innihaldsyvirlit

**1 Formæli** ......................................................................2
**2 Arbeiðslýsing**..........................................................................3
2.1. Nýggja musikkskúlalógin..............................................................3
2.2. Fígging og musikkskúlavirksemið kring landið............................3
2.3. Hoyring og frágreiðing..................................................................3
2.4. Niðurstøður og tilmæli..................................................................3

**3 Nýggja musikkskúlalógin, lýsing og grundarlag**.................4
3.1. Søguliga gongdin...........................................................................4
3.2. Orsøk og grundarlag undir broytingunum....................................4
3.3. Broytingar, dagføringar og nýggjar ásetingar................................4
a) Endamál, nýggjar ásetingar
b) Fígging, dagføringar og nýggjar ásetingar
c) Setanir og førleikakrøv, dagføringar og nýggjar ásetingar
d) Ráðgevandi nevnd, nýggj áseting
e) Kommunali musikkskúlaleiðarin, nýggjar ásetingar
f) Námsfrøðiligt ráð, nýggj áseting
3.4. Samandráttur av nýskipanini í musikkskúlalógini.........................6
3.5. Bygnaður og ásetingar um samstarv..............................................7
3.6. Bygnaður í musikkskúlaskipanini...................................................8
3.7. Yvirlit yvir bygnað og myndugleikabýti........................................8
3.8. Bygnaður.........................................................................................10
3.9. kommunal samstarvsøki

**4 Fíggjarliga skipanin**...............................................................11
4.1. Landsjáttanin...................................................................................11
4.2. Kommunala játtanin........................................................................11
4.3. Næmingagjøld..................................................................................12

**5 Musikkskúlavirksemið kring landið**....................................12
5.1. Musikkskúlastjórin..........................................................................12
5.2. Musikkskúlalærarar.........................................................................12
5.3. Musikkskúlaleiðarar.........................................................................13
5.4. Musikkskúlanæmingar.....................................................................13
5.5. Bíðilistar............................................................................................13
5.6. Serskipanir og samstarv millum musikkskúla og fólkaskúla.........13

**6 Musikkskúlarnir**.......................................................................14
6.1. Tórshavnar Musikkskúli..................................................................14
6.2. Klaksvíkar Tónlistaskúli..................................................................15
6.3. Nes Sóknar Musikkskúli..................................................................15
6.4. Norðljómur........................................................................................15
6.5. Norðurstreymoyar Musikkskúli.......................................................16
6.6. Musikkskúlin í Vágum.....................................................................16
6.7. Sandoyar Musikkskúli.....................................................................17
6.8. Musikkskúlin í Vági..........................................................................17
6.9. Suðuroyar Musikkskúli....................................................................18
6.10. Musikkskúlin á Viðareiði...............................................................18

6.11. Musikkskúlin á Fossánesi.....18
6.12. Fuglafjarðar Musikkskúli.....18
6.13. Eysturoyar Tónlistaskúli.....19
6.14. Stranda Musikkskúli.....19
6.15. Yvirlit yvir musikkskúlarnar.....19

**7 Hølisviðurskifti**.....20
7.1. Tórshavnar Musikkskúli.....20
7.2. Musikkskúlin í Vágum.....20
7.3. Klaksvíkar Tónlistaskúli.....20
7.4. Stranda Musikkskúli.....21
7.5. Nes Sóknar Musikkskúli.....21
7.6. Eysturkommunu Tónlistaskúli.....21
7.7. Suðuroyar Musikkskúli.....22
7.8. Fuglafjarðar Musikkskúli.....22
7.9. Norðljómur.....22
7.10. Sandoyar Musikkskúli.....22
7.11. Musikkskúlin í Vági.....22
7.12. Norðurstreymoyar Musikkskúli.....23
7.13. Viðareiðis Musikkskúli og Musikkskúlin á Fossánesi.....23

**8 Hoyringar og eftirmetingar**.....23
8.1. Øki, har partarnir hava gjørt viðmerkingar og tilráðingar.....24
8.2. Skrivligar viðmerkingar.....24
8.3. Musikkskúlastjórin.....25
8.4. Kommunufelagið.....26
8.5. Kommunalu musikkskúlaleiðararnir.....27
8.6. Musikklærarafelag Føroya.....30

**9 Niðurstøður og tilmæli**.....32
9.1. Setanarviðurskifti.....32
9.2. Býtið millum land og kommunur.....34
9.3. Ráðgevandi nevnd.....35
9.4. Námsfrøðiliga ráðið.....35
9.5. Hølisumstøður.....36

---

# 1. Formæli

29. mai 2017 var nýggj lóg sett í gildi fyri musikkskúlan, Løgtingslóg nr. 83 frá 29 mai 2017 um musikkskúlaskipan. Í § 11, stk. 3 í lógini er ásett, at landsstýrismaðurin eftir trimum árum, frá tí at løgtingslógin er komin í gildi, skal leggja fyri løgtingið frágreiðing um, hvørt løgtingslógin virkar eftir ætlan, herundir um broytingar skulu gerast í lógini.

Hetta arbeiði hevur drigið út, serliga grundað á, at arbeiðið at seta í gildi kunngerðir, sum skulu gerast sambært lógini, hevur kravt bæði tíð og arbeiðsorku.

Bæði Kommunufelagið og kommunalu musikkskúlaleiðararnir hava fleiri ferðir spurt eftir frágreiðingini, sum landsstýrismaðurin sambært lógini skuldi lata løgtinginum. Onkur roynd varð gjørd at hyggja eftir lógarkarminum kring musikkskúlavirksemið, og í august 2024 vórðu

ítøkilig stig tikin til at hoyra avvarðandi partar, eftirkanna um galdandi musikkskúlalóg er nøktandi karmur um musikkskúlaskipanina, og um tað eru viðurskifti, sum krevja ábøtur.

## 2. Arbeiðslýsing

Arbeiðslýsing ella ítøkilig mál vórðu ikki tøk sum grundarlag ella vegleiðing undir arbeiðinum at gera frágreiðingina, so fyrsta stigið var at gera eina ætlan fyri arbeiðið og málsgongd.

Støðið var tikið í § 11, stk. 3, har ásett er, at landsstýrismaðurin skal eftir 3 árum, frá tí at løgtingslógin er komin í gildi, leggja fyri løgtingið frágreiðing um, hvørt løgtingslógin virkar eftir ætlan, herundir um broytingar skulu gerast. Eisini verður í viðmerkingunum víst á, at arbeiðið í sambandi við frágreiðingina eigur umframt at fevna um sjálva lógina og virknaðin av henni at fevna um spurningin um tvíbýtið millum land og kommunu, og um landið skal verða býtt í kommunal samstarvsøki.

Avgjørt varð at skipa viðgerðina í hesar fýra høvuðspartar:

### 2.1. Nýggja musikkskúlalógin

Orsøk og grundarlag undir broytingunum
Lýsa broytingarnar, sum eru gjørdar í mun til løgtingslóg nr. 69 frá 7.
juni 1984 um stuðul til musikkskkúlar.
Samandráttur av nýskipanini og yvirlit yvir bygnað og boðleið

### 2.2. Fígging og musikkskúlavirksemið kring landið

Játtanarskipanin og býtið millum land og kommunu
Musikkskúlavirksemið kring landið

### 2.3. Hoyring og frágreiðing

Fundir einsæris við avvarðandi partar, Musikkskúlastjóran, umboð fyri Kommunalu musikkskúlaleiðararnar, Kommunufelagið og Musikklærarafelag Føroya.
Avvarðandi partar lata Barna- og útbúgvingarmálaráðnum skrivliga frágreiðing um, hvussu lógin virkar í verki, og um ábøtur eru neyðugar.

### 2.4. Niðurstøður og tilmæli

Felags fundir at umrøða skipanina og ymsu sjónarmiðini
Viðurskifti, sum mælt verður til at endurskoða ella broyta

Í viðmerkingunum til lógina er harumframt tilskilað, at frágreiðingin skal verða gjørd í samstarvi við Kommunufelagið og aðrar viðkomandi partar, eitt nú Musikklærarafelag Føroya.

Tey, sum hava luttikið í arbeiðinum, eru:

Martin Mouritsen, musikkskúlastjóri, Undirvísingarstýrið
Eyðun Christiansen, Kommunufelagið
Andrea Heindriksdóttir, musikkskúlaleiðari í Tórshavnar musikkskúla
Tóri Restorff Jacobsen, musikkskúlaleiðari í Nes Sóknar musikkskúla
Eirikur Skála, musikkskúlaleiðari í Musikkskúlanum í Vágum
Ragnar Festirstein, Musikklærarafelag Føroya
Maria Wang Reinert, Musikklærarafelag Føroya
Anna Hüdepohl, Musikklærarafelag Føroya
Noomi K. Rasmussen, fundarskrivari, Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Rannvá Dam í Baianstovu, fundarskrivari, Barna- og útbúgvingarmálaráðið
Súsanna Tindskarð, Barna- og útbúgvingarmálaráðið
Jenny Lydersen, forkvinna, Barna- og útbúgvingarmálaráðið

## 3. Nýggja musikkskúlalógin, lýsing og grundarlag

Tá farið var undir arbeiðið at gera frágreiðingina, hevði galdandi musikkskúlalóg sjey ár á baki, so bæði land, kommunur og musikkskúlar hava í hesum tíðarskeiði gjørt sær nakrar royndir um samspælið millum lóg og dagliga virksemið, um tað eru viðurskifti í lógini, sum ikki virka eftir ætlan ella eru torfør at skipa, og um tað annars vanta ásetingar um virksemi ella skipanir, sum áttu verið heimilað í lóg.

### 3.1. Søguliga gongdin

Verandi musikkskúlalóg avloystir, løgtingslóg nr. 69 frá frá 7. juni 1984 um stuðul til musikkskúlar, sum varð broytt við Ll. nr. 67 frá 20. mai 1996. Broytingarnar í 1996 fataðu ikki um innhaldsligar broytingar, men at ásetingar í lógini um landsskúlastjóran, landsskúlaráðið og landsskúlafyristingina vórðu broyttar til landsstýrismaðurin. Orsøkin var, at nýggj stýriskipanarlóg varð sett í gildi, sum ásetti landsstýrismannaábyrgd. Bygnaðurin í landsumsitingini varð samstundis broyttur, har farið var frá skipanini, at landsstýrisfólkini høvdu felags ábyrgd í øllum málum til landsstýrismannaábyrgd, har skipað vórðu aðalráð, har hvørt landsstýrisfólk hevði evstu ábyrgd av teimum málsøkjum, sum vórðu løgd til aðalráðið at umsita.

Løgtingslógin um stuðul til musikkskúlar hevði sostatt verið í gildi óbroytt innihaldsliga frá 1984 til 2017. Tá ið lógir hava verið í gildi drúgt áramál, so hendir ofta, at gjørdar verða praktiskar fyrisitingarligar mannagongdir í skipanini, sum tó ikki altíð eru beinleiðis fevndar av lógini. Landsgrannskoðanin hevði í fleiri førum víst á, at andsøgn var millum praksis og galdandi lóg um stuðul til musikkskúlar, m.a., at ásett er í lógini, at landsstýrismaðurin veitir stuðul til musikkskúlar og setir musikklærarar, men at fyrisitingrliga mannangongdin hevur verið, at musikkskúlaskipanin verður rikin sum ein skúli, og at játtanarstuðul ikki verður veittur beinleiðis til einstaka musikkskúlan. Musikkskúlaleiðarin hevur hinvegin skipað tímabýtið til musikkskúlarnar, sett musikkskúlalærarar í starv og lønt teimum, og síðani kravt kommunurnar eftir kommunurnar parti av lønarútreiðslunum og eftirlønargjaldi.

Við atliti at hesum viðurskiftum setti táverandi landsstýriskvinna á heysti 2016 eina nevnd at gera uppskot til broytingar í løgtingslógini um stuðul til musikkskúlar, har málið var at fáa lóg og praksis samskipað. Í nevndini sótu umboð fyri Mentamálaráðið, Kommunufelagið og Musiklærarafelag Føroya. Úrsitið av arbeiðinum var nýggj lóggáva, løgtingslóg nr. 83 frá 29. mai 20217 um musikkskúlaskipan, nevnd musikkskúlalógin.

### 3.2. Orsøk og grundarlagið undir boytingunum

Avgjørt varð, at lógin sum meginregla skuldi byggja á verandi praksis, og at broytingarnar skuldu rætta tey viðurskifti, ið landsgrannskoðanin í fleiri ár hevði víst á, at samsvar ikki var millum lóg og praksis. Ásettar eru eisini fleiri kunngerðarheimildir í lógini, serliga í sambandi við viðurskifti, sum ikki vórðu fevnd ella nærri ásett í lógini um stuðul til musikkskúlar. Í høvuðsheitum skuldi verða hildið fram við hesum viðurskiftum:

1. At lógin skuldi heimila og tryggja verandi skipan og praksis
2. At endamálið framhaldandi var at menna musikalsku evnini hjá næmingunum
3. At vera grundarlag undir einum fjøltáttaðum musikklívi
4. At hildið verður fram við fíggjarliga býtinum millum land og kommunur.

### 3.3. Broytingar, dagføringar og nýggjar ásetingar

# Frágreiðing um musikkskúlaskipanina

Broytingarnar, sum eru gjørdar, fata um bæði dagføringar og nýggjar ásetingar. Talan er um dagføringar og broytingar í endamáli, fígging, setanum og førleikakrøvum, og ásetingar um ráðgevandi nevnd, um kommunalu musikkskúlaleiðararnar og um námsfrøðiligt ráð. Broytingarnar fata um:

**a) Endamál, nýggjar ásetingar**

Nýggjar ásetingar eru gjørdar í § 2, stk. 3, 4, 5 og 6 viðvíkjandi undirvísing á miðnámsstigi og orgulútbúgving.
*Stk. 3. Musikkskúlin kann eisini geva undirvísing á miðnámsstigi, sum endar við próvtøku.*
*Stk. 4. Musikkskúlin kann geva preliminera orgulútbúgving, sum endar við próvtøku.*
*Stk. 5. Undirvísing sambært stk. 3 og 4 kann bert verða sett í verk eftir góðkenning musikkskúlastjórans.*
*Stk. 6. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um undirvísing og próvtøku sambært stk. 3 og 4 herundir kærur og kærufreistir.*

**b) Fígging, dagføringar og nýggjar ásetingar**

Ásetingin viðvíkjandi fígging er lýst í § 4 um fígging og ábyrgd hjá landi og kommunum.
*Musikkskúlaskipanin verður fíggjað soleiðis, at landið rindar løn til musikkskúlastjóran og meginfyrisiting, ferðing hjá musikkskúlalærarum og 50% av musikkskúlalæraralønum. Landið umsitur og avgreiðir lønir til musikkskúlalærarar.*
*Stk. 2. Kommunan endurrindar landinum 50% av musikkskúlalæraralønunum.*
*Stk. 3. Kommunan lønar kommunala musikkskúlaleiðaranum og øðrum starvsfólki, sum kommunan setur í starv við musikkskúlan.*
*Stk. 4. Kommunan útvegar musikkskúlanum hóskandi høli, undirvísingartilfar, amboð og ljóðføri.*

**c) Setanir og førleikakrøv, dagføringar og nýggjar ásetingar**

Í § 5 eru gjørdar nærri ásetingar viðvíkjandi musikkskúlastjóranum í stk. 2 pkt. 2, stk. 3, 4 og 5. Samstundis er heitið broytt frá leiðara til musikkskúlastjóra.
*Stk. 2, pkt. 2 og antin hava nomið ella nema sær góðkenda leiðsluútbúgving.*
*Stk. 3. Musikkskúlastjórin skipar tíma- og lærugreinabýtið í musikkskúlaskipanini á hvørjum ári og hevur evstu námsfrøðiligu og fakligu ábyrgdina av undirvísingini. Herundir viðgerð av kærum í sambandi við próvtøku.*
*Stk. 4. Avgerðir musikkskúlastjórans í kærumálum í sambandi við próvtøkur eru endaligar innan fyrisitingina.*
*Stk. 5. Musikkskúlastjórin setir og loysir úr starvi musikkskúlalærarar í samráð við avvarðandi kommunala musikkskúlaleiðara. Alt landið er at rokna sum eitt setanarøki.*

**d) Ráðgevandi nevnd, nýggja áseting**

Í § 7 stk. 1 og 2 er skipað ein ráðgevandi nevnd, sum er eitt nýtt átak. Samstundis er §7 nevndin strikað. §7 nevndin var mannað við umboðum fyri musikkskúlarnar og landsstýrismannin og skuldi vera musikkskúlaleiðaranum til hjálpar. Í staðin er skipað ein ráðgevandi nevnd.

*§ 7. At vera musikkskúlastjóranum til hjálpar at samskipa musikkundirvísingina verður skipað ein nevnd. Í nevndini sita kommunalu musikkskúlaleiðararnir og musikkskúlastjórin, sum er formaður í nevndini.*
*Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetir í samráð við kommunurnar nærri reglur fyri virki nevndarinnar.*

**e) Kommunali musikkskúlaleiðarin, nýggjar ásetingar**

Bæði § 8 og § 9 eru nýggjar, har ásetingar eru gjørdar um kommunalar musikkskúlaleiðarar. Ásetingarnar í § 3 eru samstundis strikaðar m.a. stk. 3 og 4, har ásett var, at nemingagrundarlagið fyri at fáa stuðul skuldi í minsta lagi vera 20 næmingar, og at skúlin skuldi hava minst ein lærara í føstum starvi.

*§ 8. Fyri musikkskúlan setir kommunan ein kommunalan musikkskúlaleiðara.*
*Stk. 2. Kommunali musikkskúlaleiðarin skal hava musikpedagogiskar førleikar, sambært § 6, 1. stk., tó undantikið musikkskúlar, sum eru undir 1 ársverk.*
*Stk. 3. Kommunali musikkskúlaleiðarin skal antin hava nomið ella nema sær góðkenda leiðsluútbúgving, tó undantikið musikkskúlar, sum eru undir 3 ársverk.*

*§ 9. Kommunali musikkskúlaleiðarin hevur dagligu leiðsluna av musikkskúlanum í kommununi.*
*Stk. 2. Kommunali musikkskúlaleiðarin hevur ábyrgd av námsfrøðiliga arbeiðinum í musikkskúlanum í kommununi, sbr. tó § 5, stk. 3, 4 og 5.*
*Stk. 3. Lærarar hava, hvat viðvíkur dagliga virkseminum, tilvísing til kommunala musikkskúlaleiðaran, sum leiðir og býtir arbeiðið, sbr. tó § 5, stk. 3, 4 og 5.*
*Stk. 4. Kommunali musikkskúlaleiðarin ger leiðreglur viðvíkjandi upptøku, virksemi, undirvísingaramboðum o.ø. í kommunala musikkskúlanum, sbr. tó § 5, stk. 3, 4 og 5.*
*Stk. 5. Landsstýrismaðurin ásetir í samráð við kommunurnar nærri reglur um virki kommunala musikkskúlaleiðarans.*

**f) Námsfrøðiligt ráð, nýggj áseting**

§ 10 er nýggj áseting, har reglur eru gjørdar um námsfrøðiligt ráð, sum skal ráðgeva kommunalu musikkskúlaleiðarunum.

*§ 10. Til hvønn musikkskúla, har samlaða undirvísingartímatalið svarar til minst 3 fulltíðar lærarastørv, verður skipað eitt námsfrøðiligt ráð at ráðgeva kommunala musikkskúlaleiðaranum.*
*Stk. 2. Limir í ráðnum eru øll tey starvsfólk, ið hava undirvísingarligar og aðrar námsfrøðiligar uppgávur í skúlanum. Tó kunnu starvsfólk, sum hava setanarbrot minni enn 0,3 verða frítikin at møta á fundi. Kommunali musikkskúlaleiðarin er formaður í námsfrøðiliga ráðnum.*
*Stk. 3. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um virkið hjá námsfrøðiliga ráðnum.*

### 3.4. Samanddráttur av nýskipanini í musikkskúlalógini

Meginreglurnar um musikkskúlaskipan leggja dent á at skipa eina fjølbroytta samanhangandi musikkskúlaskipan í Føroyum. Landsstýrismaðurin hevur meginfyrisitingina og yvirumsjónina av musikkskúlanum. Landsstýrismaðurin setur musikkskúlastjóra at hava yvirskipaðu fakligu, námsfrøðiligu, fíggjarligu og samskipandi uppgávurnar fyri alla musikkundirvísing. Landsumfatandi musikkundirvísing verður skipað lokalt í kommununum ella í kommunalum samstørvum. Kommunurnar seta kommunalar leiðarar at fyriskipa virksemið á staðnum. Musikkskúlastjórin er setanarmyndugleiki hjá musikkskúlalærarum. Nýggju ásetingarnar eru í høvuðsheitum:

- Landsstýrismaðurin setir musikkskúlastjóra. Ásett er í lógini, hvat útbúgvingarstig músikkskúlastjórin skal hava umframt leiðsluútbúgving.
- Musikkskúlastjórin leiðir og samskipar musikkskúlaskipanina. Musikkskúlastjórin hevur yvirskipaðu fakligu, námsfrøðiligu, fíggjarligu og samskipandi ábyrgdina fyri alla musikkundirvísing. Musikkskúlastjórin er setanarmyndugleiki í sambandi við at seta og loysa úr starvi musikkskúlalærarar og kærumyndugleiki í sambandi við

prótøkur. Musikkskúlastjórin fremur starvssetanir og uppsagnir í samstarvi við kommunala musikkskúlaleiðaran. Kunngerð um virkið hjá musikkskúlastjóranum er sett í gildi á vári 2019.

- Kommunurnar seta kommunalar musikkskúlaleiðarar, ið hava dagligu leiðsluna um hendur. Ásett verður, hvat útbúgvingarstig kommunalu musikkskúlaleiðararnir skulu hava umframt leiðsluútbúgving.
- Lærarar hava í dagliga virkseminum tilvísing til kommunala musikkskúlaleiðaran, sum leiðir og býtir arbeiðið á staðnum.
- Heimildirnar hjá kommunalu musikkskúlaleiðarunum verða ásettar í kunngerð, sum verður gjørd í samstarvi millum Mentamálaráði og Kommunufelagið. Talan er um nýggja kunngerð, sum er sett í gildi á vári 2019
- Musikkskúlin fær heimild at skipa undirvísing á miðnámsstigi, sum endar við prótøku, og at skipa preliminera orgulútbúgving, sum endar við prótøku. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um undirvísingina, prótøkuviðurskifti, kærur og kærufreistir. Kunngerðir eru gjørdar um orgulleikaraútbúgving, um prótøkur, prótalsstiga og kærur í sambandi við prótøkur á prelimineru orgulleikaraútbúgvingini, um undirvísing í musikkskúlamiðnámi og um prótøkur, prótalsstiga og kærur í sambandi við prótøkur í musikkskúlamiðnámsútbúgvingini. Báðar settar í gildi á sumri 2019.
- Sett verður ein ráðgevandi nevnd við øllum kommunalu musikkskúlaleiðarunum at ráðgeva musikkskúlastjóranum, sum er formaður í ráðnum. Samstundis verður Grein 7 nevndin strikað. Landsstýrismaðurin ásetur í samráð við kommunurnar nærri reglur um virksemið hjá ráðnum. Kunngerð er sett í gildi á vári 2019.
- Størru musikkskúlarnir skipa eitt námsfrøðiligt ráð, umboðandi øll tey starvsfólk, ið hava undirvísingarligar og aðrar námsfrøðiligar uppgávur í skúlanum. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um virkisøkið hjá námsfrøðiliga ráðnum. Kunngerð um virkið hjá námsfrøðiliga ráðnum hjá musikkskúla er sett í gildi á vári 2019.

### 3.5. Bygnaður og ásetingar um samstarv

Musikkskúlalógin ásetur samstarv millum musikkskúlastjóran og kommunalu musikkskúlaleiðararnar í sambandi við lærarasetanir. Í serligu viðmerkingunum til § 5, stk. 3 er eisini tilskilað, at mannagongdin er, at í dagligum verki skipar musikkskúlstjórin tíma- og lærugreinabýtið í musikkskúlaskipanini í tøttum samstarvi við kommunalu musikkskúlaleiðararnar.
Sambært kunngerðini hevur musikkskúlastjórin ábyrgd av, at undirvísingin verður framd sambært lógini. Hann skal tryggja, at musikkskúlarnir halda tær skyldur, sum ásettar eru í lógini, skal verða musikkskúlunum til hjálpar við vegleiðing og ráðgeving í fakligum og námsfrøðiligum spurningum. Hann setur musikkskúlalærarar og skal samstarva við kommununalu leiðararnar í setanarmálum og í sambandi við lærara-, tíma- og lærugreinabýtið í skúlunum.

Í § 8 og 9 í lógini, sum umrøða kommunala musikkskúlaleiðaran, er eingin áseting um samstarv millum kommunalu musikkskúlaleiðaran og musikkskúlastjóran eins og tað er í § 5, stk. 5 um musikkskúlastjóran. Ásett er tó í serligu viðmerkingunum til § 9, stk. 2, at kommunali musikkskúlaleiðarin hevur námsfrøðiligu ábyrdina fyri virkseminum í kommunala musikkskúlanum og eigur at fremja hetta arbeiði í samstarvi og samráð við musikkskúlastjóran.

Kommunurnar seta kommunalu musikkskúlaleiðararnar, sum sbrt. § 5 í kunngerðini um kommunala musikkskúlaleiðaran leiða og býta arbeiðið innan fyri tað lærarabýti, tímabýti og lærugreinabýti, ið musikkskúlastjórin hevur játtað kommunala musikkskúlanum. Í § 4 í kunngerðini er ásett, at kommunali musikkskúlaleiðarin og musikkskúlastjórin eiga at vera í

regluligum og skipaðum samskifti og samstarvi. Eingin áseting er í kunngerðini um samstarv millum kommunala musikkskúlaleiðaran og musikkskúlastjóran um setanarmál ella tíma- og lærugreinabýti eins og ásett er í § 2, stk. 3 í lógini og í § 7 í kunngerðini um musikkskúlastjóran. Ásett er í § 9, stk. 3 í lógini og í § 6 í kunngerðini um kommunala musikkskúlastjóran, at lærararnir í dagliga virkseminum vísa til kommunala musikkskúlaleiðaran.

### 3.6. Bygnaður í musikkskúlaskipanini

Bygnaðarliga er ikki ein greið skipan viðvíkjandi leiðslu og samstarvsskipan millum musikkskúlastjóran og kommunalu musikkskúlaleiðararnar. Kommunurnar seta og rinda lønina hjá kommunalu musikkskúlaleiðarunum, sum hevur námsfrøðiligu ábyrgdina av virkseminum á staðnum. Musikkskúlastjórin tillutar einstaka musikkskúlanum tíma- og lærugreinabýtið, setir lærarar og hevur eisini yvirskipaðu fakligu og námsfrøðiligu ábyrgdina, men hevur onga starvsliga ábyrgd ella myndugleika viðvíkjandi kommunala musikkskúlaleiðaranum. Musikkskúlastjórin skal inna sítt arbeiði í samstarvi við kommunala musikkskúlaleiðaran, men í lóg og reglum er hetta samstarv í stóran mun álagt musikkskúlastjóranum.

Ætlanin við nýggju lógini hevur uttan iva verið at styrkja samskipanina millum musikkskúlastjóran og kommunalu musikkskúlaleiðararnar. Hetta sæst m.a. aftur í skipanini við ráðgevandi nevndini, sum skal vera musikkskúlastjóranum til hjálpar at skipa musikkundirvísingina. Víst verður eisini á í kunngerðini fyri ráðgevandi nevndina, at virkisøkið hjá ráðgevandi nevndini er at tryggja regluligt og skipað samskifti og samstarv millum musikkskúlastjóran og kommunalu musikkskúlaleiðararnar.

Viðvíkjandi musikkskúlalærarum, so eru teir undir tveimum myndugleikapersónum. Musikkskúlastjórin er setanarmyndugleiki, men í sínum dagliga yrki vísa musikkskúlalærarar til kommunala musikkskúlaleiðaran, sum leiðir og býtir arbeiðið í kommunala musikkskúlanum, tó við atliti at § 5, stk. 3, 4. og 5, har ásett er, at musikkskúlastjórin hevur evstu ábyrgd av námsfrøðiligu og fakligu ábyrgdina av undirvísingini og skipar tíma- og lærugreinabýtið í musikkskúlaskipanini.

### 3.7. Yvirlit yvir bygnað og myndugleikabýti

Musikkskúlaskipanin er ein samskipan millum land og kommunu við tveimum myndugleikapørtum bæði setanarliga og fíggjarliga. Landið hevur yvirskipaðu fakligu og námsfrøðiligu ábyrgdina, meðan kommunurnar hava ábyrgdina av leiðsluni og virkseminum á staðnum. Landið rindar løninahjá muskikkskúlastjóranum, 50% av læraralønunum, ferðing hjá musikkskúlalærarum og fyrisitingina hjá musikkskúlastjóranum.

Kommunurnar rinda 50% av læraralønum, lønina hjá kommunala musikkskúlaleiðararum, fyrisitingina á staðnum og útvegar høli, undirvísingaramboð og tilfar. Næmingarnir rinda kommununi árligt gjald, sum landsstýrismaðurin skal góðkenna. Bygnaður og ábyrgdarøki verða lýst niðanfyri við tilskilan um, hvør hevur ábyrgd av hvørjum øki.

**Landsstýrismaðurin**
- Meginfyrisiting og yvirumsjón
- Setur musikkskúlastjóran

**Musikkskúlastjórin**
- Evstu fakligu og námsfrøðiligu ábyrgdina av undirvísingini
- Umsitur yvirskipaðu fakligu, námsfrøðiligu, fíggjarligu og samskipandi uppgávurnar fyri alla musikkundirvísing

- Setur lærarar í samráð við kommunalu leiðararnar
- Skipar tíma- og lærugreinabýtið í samráð við kommunala musikkskúlaleiðaran
- Evsti kærumyndugleiki í próvtøkumálum

**Ráðgevandi nevndin**

- Kommunalu musikkskúlaleiðararnir og musikkskúlastjórin, sum er formaður
- Hjálpa musikkskúlastjóranum at samskipa musikkskúlaundirvísingina og tryggja regluligt og skipað samskifti millum musikkskúlastjóran og kommunalu musikkskúlaleiðararnar

**Kommunurnar**

- Seta kommunalar musikkskúlaleiðarar
- Rinda lønina hjá kommunala musikkskúlaleiðaranum og starvsfólki, sum kommunan setur í starv
- Endurrinda landinum 50% av musikkskúlalæraralønunum
- Útvegar høli, undirvísingartilfar, amboð og ljóðføri

**Kommunalu musikkskúlaleiðararnir**

- Dagligu leiðsluna av musikkskúlanum á staðnum
- Ábyrgd av námsfrøðiliga arbeiðinum í musikkskúlanum á staðnum
- Leiða og skipa arbeiðið hjá lærarunum, sum starvast í kommunala musikkskúlanum

**Musikkskúlalærarar**

- Musikkskúlastjórin setur og loysir úr starvi musikkskúlalærararnar í samstarvi við avvarðandi kommunala musikkskúlaleiðara
- Í dagliga virkseminum vísa musikkskúlalærararnir til kommunala musikkskúlaleiðaran
- Nógvir musikkskúlalærarar undirvísa í fleiri musikkskúlum. Landið er at rokna sum eitt setanarøki.

### 3.8. Bygnaðurin í musikkskúlaskipani



### 3.9. Kommunal samstarvsøki

Ásett er í § 3, stk. 1 í lógini, at treytin fyri at koma undir musikkskúlaskipanina sambært galdandi lóg er, at musikkskúlin skal vera knýttur at eini kommunu ella einum kommunalum samstarvi.

Í verandi skipan eru fleiri kommunal samstørv, har musikkskúlin er felags fyri íbúgvar í tveimum ella fleiri kommunum. Talan er um hesi øki:

- Suðuroyar musikkskúli, sum fatar um kommunurnar í Suðuroy, uttan Vágs kommunu
- Sandoyar musikkskúli, sum fatar um kommunurnar í Sandoy
- Vága musikkskúli, sum fatar um kommunurnar í Vágum,
- Nes sóknar musikkskúli, sum fatar um Runavíkar- og Nes kommunu
- Norðljómur, sum fatar um Eiðis- og Sunda kommunu
- Norðstreymoyar musikkskúli, sum fatar um Vestmanna og Kvívíkar kommunu.

Í viðmerkingum til § 11, stk. 3 í lógini verður víst á, at frágreiðingin eigur umframt at fevna um sjálva lógina og virknaðin av henni eisini at fevnvna um spurningin um tvíbýtið millum land og kommunu, og um landið skal verða býtt upp í kommunal samstarvsøki.

Kommunurnar hava skipað seg í nevndu samstarvsøki, skipanin virkar, sum er, og flest allar kommunur eru knýttar at einum musikkskúla. Samstørvini eru ein kommunal tilgongd, har dentur verður lagdur á at samskipa og bjóða mennandi undirvísingartilboð. Umráðandi er, at øll øki í landinum, í hvussu er, har sum børn og ungfólk búgva, verða knýtt at einum musikkskúla.

Evnið er nevnt á felags fundi, men eingin niðurstøða er gjørd um at mæla til at seta arbeiði í verk at broyta kommunalu samstørvini. Hetta krevur eina nærri viðgerð saman við kommununum og kommunufelagnum. Musikklærarafelagið hevu tó í viðmerkingum víst á, at mælt verður til at arbeiða víðari við núverandi skipan. Skipanin riggar, men broytingar eru neyðugar.

## 4. Fíggjarliga skipanin

Ásett er í § 4 í musikkskúlalógini, hvussu musikkskúlaskipanin verður fíggjað. Landið rindar løn til musikkskúlastjóran og meginfyrisiting, ferðing hjá musikkskúlalærarum og 50% av musikkskúlalæraralønum. Landið umsitur og avgreiðir lønirnar hjá musikkskúlalærarum.

### 4.1. Landsjáttanin

Játtanin hjá landinum til musikkskúlavirksemið á fíggjarlógini í 2025 er 20,6 mió. kr. Nýttar verða 18, 26 mió. kr. til musikkskúlaundirvísing. Restin av játtanini fer til leiðslu og umsiting og til ferðing hjá musikklærarum. Kommurnar rinda somu upphædd sum landið til undirvísing, so samlaða lønarupphæddin til undirvísingarvirksemi er 36,5 mió. kr.

### 4.2. Kommunala játtanin

Kommunurnar endurrinda landinum 50% av læraralønunum, og er upphæddin 18,26 mió. kr. í 2025. Harumframt rinda kommunurnar lønina hjá kommunala musikkskúlaleiðaranum og øðrum starvsfólki, sum kommunan setur í starv við musikkskúlan. Kommunan útvegar musikkskúlanum hóskandi høli, undirvísingartilfar, amboð og ljóðføri.

Kommufelagið hevur í talvu lýst kostnaðin fyri fíggjarárini 2022, 2023 og 2024.

| | 2022 | 2023 | 2024 |
|---|---|---|---|
| Landið | 17,4 | 17,9 | 19,4 |
| Kommunurnar | 15,0 | 16,1 | 17,1 |
| Kommunalur rakstur | 6,0 | 6,4 | 6,6 |
| Musikkskúlin tilsamans | 38,4 | 40,4 | 43,1 |
| Kommunur íalt | 21,0 | 22,5 | 23,6 |
| Landið í % | 45,3% | 44,3% | 45% |
| Kommunurnar í % | 5 54,7% | 55,7% | 55% |

### 4.3. Næmingagjøld

Ásett er í § 3, stk. 2, at næmingar skulu gjalda kommunala musikkskúlanum eitt árligt gjald, sum landsstýrismaðurin skal góðkenna. Næmingagjaldið verður ásett kommunalt.

Í næmingagjaldinum er øll undirvísingin íroknað: undirvísing, samanspæl, orkesturspæl, teori, hoyrilæra ella annað.

Gjøldini eru ymisk frá kr. 1000 – kr. 5000 um árið. Samlaða inntøkan hjá kommununum fyri næmingagjøld er á leið kr. 3 mió.

## 5. Musikkskúlavirksemið kring landið

Tað eru 14 musikkskúlar kring landið. Teir eru ymiskir í vavi bæði viðvíkjandi næmingagrundarlagi, tímajáttan og undirvísingartilboðum innan ymisk ljóðføri, samanspæl, orkestur og kór. Musikkskúlin kann eisini veita undirvísing á miðnámsstigi, sum endar við prógtøku, og kann eisini skipa fyri orgulútbúgving. Hesar útbúgvingar hav verið skipaðar á Tórshavnar musikkskúla. Kommununalu musikkskúlaleiðararnir vísa á, at samstarv átti eisini at verið við Setrið og hægri lærustovnar uttanlands og at hetta verður ásett í § 2 í lógini.

### 5.1. Musikkskúlastjórin

Musikkskúlastjórin skal hava musikknámsfrøðiligt prógv frá musikkkonservatorium ella aðra samsvarandi útbúgving umframt leiðsluútbúgving**.** Landsstýrismaðurin setur musikkskúlastjóran, sum hevur yvirskipaðu fakligu, námsfrøðiligu, fíggjarligu og samskipandi uppgávurnar fyri alla musikkundirvísing í musikkskúlaskipanini.

### 5.2. Musikkskúlalærarar

Musikkskúlalærarar skulu hava musikknámsfrøðiligt prógv frá musikkkonservatorium ella aðra samsvarandi útbúgving. Sambært yvirliti frá musikkskúlastjóranum í juni 2025, so eru 62,2 læraraársverk í musikkskúlaskipanini, og tað starvast 85 musikkskúlalærarar samanlagt í øllum musikkskúlunum. 50 lærarar undirvísa fulla tíð, 35 lærarar undirvísa í parttíðarstarvi svarandi til 12,2 ársverk. 27 lærarar (16,0 ársverk) starvast bert í einum musikkskúla. 58 lærarar (46,2 ársverk) undirvísa í meira enn einum musikkskúla.

Lærararnir ferðast tilsamans 100 ferðir hvørja viku millum musikkskúlar. Í einum musikkskúla kunnu eisini vera fleiri undirvísingarstøð.

Undirvísingartímatalið um vikuna er 1249,5 klokkutímar. Tímarnir verða tillutaðir musikkskúlunum í mun til næmingatalið, 0-18 ár, í kommununi ella samstarvsøkinum. Ein vanlig lektión er 30 minuttir um vikuna. Lektiónir kunnu tó vera 20, 30, 40, 45, 60 ella 90 minuttir um vikuna. Orkesturvenjingar eru vanliga 60 minuttir um vikuna. Tilsamans eru umleið 3000 lektiónir um vikuna.

### 5.3. Musikkskúlaleiðarar

Musikkskúlaleiðarar skulu hava musikknámsfrøðiligt prógv frá musikkkonservatorium ella samsvarandi musikkútbúgving umframt leiðsluútbúgving, undantikið í musikkskúlum, sum eru undir 3 ársverk. Flestu musikkskúlaleiðarar hava tvær setanir, eina sum musikkskúlaleiðari, har kommunan er setanarmyndugleiki og eina sum musikkskúlalærari, har musikkskúlastjórin er setanarmyndugleiki.

Tað er bara í Tórshavnar Musikkskúla, sum er nógv tann størsti musikkskúlin, at leiðarastarvið er fulltíðarstarv, og starvið sum varaleiðari er eisini fulltíðarstarv. Í hinum musikkskúlunum er støðan øðrvísi. Í átta musikkskúlum er leiðarastarvið hálvtíðarstarv og í hinum minni enn hálvtíðar starv.

Setanin hjá musikkskúlaleiðarunum sum lærari er eisini ymisk í ymsu musikkskúlunum í mun til skúlastødd. Í sjey musikkskúlum arbeiðir leiðslan fulla tíð sum musikklærari umframt at vera leiðari, í hinum er setanarbrotið nakað lægri.

### 5.4. Musikkskúlanæmingar

Flestu næmingar spæla orkesturljóðføri og møta 2 ferðir um vikuna, eina ferð til undirvísing og eina ferð til samanspæl. Sama er galdandi fyri næmingar í sangi. Næmingar, sum ganga til klaver, møta í flestu førum eina ferð um vikuna til einstaklingaundirvísing.

Tað vóru 2.091 næmingar, sum fingu einstaklingaundirvísing. Virknisnæmingatalið var 4.199 í 2025. Virknisnæmingatalið er samanteljing av øllum lektiónum, har sami næmingur er virkin í undirvísing og eisini luttekur í samanspæli, orkestri, kóri ella hjálærugrein.

### 5.3 Bíðilistar

Musikkskúlaundirvísing hevur høga raðfesting í Føroyum. Hóast skipanin er ment, so eru tað framvegis nógv børn og ung, sum standa á bíðilista til fáa musikkundirvísing. Sambært yvirliti í oktober 2025 frá kommunalu musikkskúlaleiðarunum, so eru framvegis langir bílistar í musikkskúlanum. Í Tórshavnar Musikkskúla standa 340 næmingar á bíðilista og tilsamans í hinum musikkskúlunum eru 349 næmingar á bíðilista. Hetta eru alt næmingar, iðhava aldur til at byrja í hesum skúlaárinum, sum standa á bíðilista.

### 5.5. Serskipanir og samstarv millum fólkaskúla og musikkskúla

Ásett er í § 1, stk. 2 í lógini um musikkskúlaskipan, at musikkskúlar kunnu samstarva við skúlar, mentanarstovnar og musikkfelagsskapir.
Fleiri musikkskúlar samstarva við fólkaskúlar bæði um undirvísing hjá næmingum í skúlatíðini og um hølir til tónleikaundirvísing. Í Tórshavnar musikkskúla eru tvær serskipanir, Litir í leiki

og ljóð í leiki, har næmingar fara til upptøku og kunnu byrja í musikkskúlanum samstundis, sum teir byrja í fólkaskúlanum.

Litir í leiki er eitt samstarv millum Skúlan á Fløtum og Tórshavnar musikkskúla, og Ljóð í leiki er samstarv millum Skúlan við Løgmannabreyt og Tórshavnar musikkskúla. Skipanirnar eru undir musikkskúlaskipanini viðvíkjandi løn, lærarum og játtanarkarmi. Hesir næmingar fylgja ikki somu tilmelding til musikkskúla, sum aðrir næmingar í Tórshavnar kommunu. Næmingarnir verða tiknir inn, um teir lúka upptøkukrøvini, og tí standa teir ikki á bíðilista, eins og aðrir næmingar í musikkskúlaskipanini.

Hetta hevur verið ein skipan, sum fólkaskúlarnir halda hevur roynst væl. Umleið helvtin av næmingunum heldur fram í musikkskúlanum eftir 3. flokk, men væl færri halda fram í hádeild.

Sum er, so eru tað bara næmingar í tveimum skúlum, sum hava henda møguleika, og tað hevur skapt ójavnað um, hvørjir næmingar sleppa at ganga til tónleikaundirvísing í Tórshavnar musikkskúla. Litir í leiki byrjaði sum ein royndarverkætlan, men er síðani vorðin ein føst samstarvsskipan millum Skúlan á Fløtum og Tórshavnar musikkskúla.

Sum er lúka skipanirnar, Litir í leiki og ljóð í leiki, ikki ásetingina í § 3, stk. 2 í lógini um, at undirvísingin skal standa øllum í boði, umframt at skipanin gevur næmingunum møguleika at luttaka í musikkskúlanum, tí at teir eru innskrivaðir í ávísan skúla. Hetta eru viðurskifti, sum ikki eru í lagi, og sum hugt verður nærri eftir. Um heimildin var greið og fígging var tøk, so hevði verið møguligt hjá fleiri næmingum kring landið at luttikið í samsvarandi tónleikatilboðum.

# 6. Musikkskúlarnir

## 6.1. Tórshavnar Musikkskúli

Í Tórshavnar musikkskúla eru 29 ársverk, og er lærarataliđ 60 lærarar. Í 11 av hesum ársverkum starvast 18 lærarar, sum bara undirvísa í Havn, 7 lærarar fulla tíð, hinir hálva tíð ella minni.

Tímataliđ í Tórshavnar musikkskúla er 501 klokkutímar um vikuna umframt 78 tímar á musikkskúlamiðnámi. Næmingataliđ er 828, umframt hetta eru 28 næmingar, sum ganga á musikkskúlamiðnámi. Virknisnæmingataliđ er 2.343.

**Undirvísingarvirksemið í Tórshavnar Musikkskúla**

Undirvíst verður í:
**Strokljóðføri:** violin, viola, cello, kontrabass.
**Træblásara:** tvørfloyta, obo, klarinett, fagott, saxofon.
**Messingljóðføri:** trompet, cornet, althorn, valdhorn, bariton, euphonium, trombon, tuba.
**Streingjaljóðføri:** gittar, elgittar, elbass.
**Akkordeon:** akkordeon, harmonika.
**Slagverki:** trummur, xylofon, paukur o.a.
**Sangi:** solo, kór.
**Klaveri, orgli og kirkjuorgli.**

**Komposition og sangskriving.**
**Tónleikaframleiðslu.**
**Teori og hoyrilæru.**
**Samanspæli og orkestri.**
**Musikkspælistovu.**

### 6.2. Klaksvíkar Tónlistaskúli

Í Klaksvíkar Tónlistaskúla eru 6 ársverk. Læraratalið er 13 lærarar. Í 3 av hesum ársverkum starvast 5 lærarar, sum bara undirvísa í Klaksvík, 2 fulla tíð og hinir parttíð.

Tímatalið er 120 klokkutímar um vikuna. Næmingatalið er 224 næmingar og samanlagt eru 339 virknisnæmingar.

**Undirvísingarvirksemið í Klaksvíkar Tónlistaskúla**

Undirvíst verður í:
**Strokljóðføri:** violin, viola, cello, Kontrabass.
**Træblásara:** tvørfloyta, blokkfloyta.
**Messingljóðføri:** trompet, cornet, althorn, valdhorn, bariton, euphonium, trombon, tuba.
**Streingjaljóðføri:** gittar, elgittar, elbass.
**Slagverki:** trummur, xylofon, paukur o.a.
**Sangi:** skúlakór.
**Klaveri.**
**Teori og hoyrilæru.**
**Samanspæli og orkestri.**
**Musikkspælistovu.**

### 6.3. Nes Sóknar Musikkskúli

Í Nes Sóknar Musikkskúla eru 5,5 ársverk. Læraratalið er 17 lærarar. Eingin lærari starvast hvørki fulla tíð ella bara í Nes Sóknar musikkskúla.

Tímatalið er 109,5 klokkutímar um vikuna. Næmingatalið er 233 næmingar og samanlagt eru 368 virknisnæmingar.

**Undirvísingarvirksemið í Nes Sóknar Musikkskúla**

Undirvíst verður í:
**Strokljóðføri:** violin, viola, cello, Kontrabass.
**Træblásara:** tvørfloyta, klarinett, saxofon.
**Messingljóðføri:** trompet, cornet, althorn, valdhorn, bariton, euphonium, trombone og tuba.
**Streingjalóðføri:** gittar, elgittar og elbass.
**Akkordeon:** akkordeon og harmonika.
**Slagverki:** trummur, xylofon, paukur o.a.
**Sangi:** solo og kór.
**Klaveri, Orgli og Kirkjuorgli.**
**Teori og Hoyrilæru.**
**Samanspæli og Orkestri.**

**Musikkspælistovu.**

## 6.4. Norðljómur

Í Norðljómi eru 2,6 ársverk. Lærarartalið er 8 lærarar. Eingin lærari starvast hvørki fulla tíð ella bara í Norðljómi.
Tímatalið er 50,5 klokkutímar um vikuna. Næmingatalið er 88 næmingar og samanlagt eru 137 virknisnæmingar.

**Undirvísingarvirksemið í Norðljómi**

Undirvíst verður í:

**Træblásara:** tvørfloyta, obo, klarinett, fagott, saxofon.

**Messingljóðføri:** trompet, cornet, althorn, valdhorn, bariton, euphonium, trombon, tuba.

**Streingjaljóðføri:** gittar, elgittar, elbass.

**Slagverki:** trummur, xylofon o.a.

**Klaveri.**

**Samanspæli og Orkestri.**

## 6.5. Norðurstreymoyar Musikkskúli

Í Norðurstreymoyar Musikkskúla eru 2,4 ársverk. Lærarartalið er 8 lærarar, og av hesum starvast ein lærari fulla tíð í Norðurstreymoyar Musikkskúla.

Tímatalið er 47,5 klokkutímar um vikuna. Næmingatalið er 86 næmingar og samanlagt eru 146 virknisnæmingar.

**Undirvísingarvirksemið í Norðurstreymoyar Musikkskúla**

Undirvíst verður í:

**Strokljóðføri:** violin

**Messingljóðføri:** trompet, cornet, althorn, bariton, euphonium, trombon, tuba.

**Streingjaljóðføri:** gittar, elgittar, elbass.

**Slagverki:** trummur, xylofon o.a.

**Klaver og Kirkjuorgli.**

**Sangskriving.**

**Teori og Hoyrilæru.**

**Samanspæli og Orkestri .**

**Musikkspælistovu.**

## 6.6. Musikkskúlin í Vágum

Í Musikkskúlanum í Vágum eru 4,25 ársverk. Lærarartalið er 13 lærarar. Eingin lærari starvast hvørki fulla tíð ella bara í Musikkskúlanum í Vágum.

Tímatalið er 84,5 klokkutímar um vikuna. Næmingatalið er 125 næmingar og samanlagt eru 170 virknisnæmingar.

**Undirvísingarvirksemið í Musikkskúlanum í Vágum**

Undirvíst verður í:

**Strokljóðføri:** Kontrabass.
**Træblásara:** tvørfloyta, klarinett, saxofon.
**Messingljóðføri:** trompet, cornet, althorn, valdhorn, bariton, euphonium, trombon, tuba.
**Streingjaljóðføri:** gittar, elgittar, elbass.
**Slagverki:** trummur, xylofon, paukur o.a.
**Sangi:** solo, kór.
**Klaveri og kirkjuorgli.**
**Sangskriving.**
**Teori og Hoyrilæru.**
**Samanspæli og orkestri.**

## 6.7. Sandoyar Musikkskúli

Í Sandoyar Musikkskúla eru 1,75 ársverk. Læraratalið er 6 lærarar. Eingin lærari starvast hvørki fulla tíð ella bara í Sandoyar Musikkskúla.

Tímatalið er 34,5 klokkutímar um vikuna. Næmingataliðer 47 næmingar og samanlagt eru 84 virknisnæmingar.

**Undirvísingarvirksemið í Sandoyar Musikkskúla**

Undirvíst verður í:
**Strokljóðføri:** violin.
**Træblásara:** tvørfloyta.
**Streingjaljóðføri:** gittar, elgittar, elbass.
**Sangi:** solo.
**Klaveri, orgli og kirkjuorgli.**
**Teori, hoyrilæru og Samanspæli.**

## 6.8. Musikkskúlin í Vági

Í Musikkskúlanum í Vági eru 1,33 ársverk. Lærarataliðer 5 lærarar. Eingin lærari starvast hvørki fulla tíð ella bara í musikkskúlanum í Vági.

Tímataliðer 26,5 klokkutímar um vikuna. Næmingataliðer 50 næmingar og samanlagt eru 64 virknisnæmingar.

**Undirvísingarvirksemið í Musikkskúlanum í Vági**

Undirvíst verður í:
**Strokljóðføri:** Kontrabass.
**Messingljóðføri:** trompet, cornet, althorn, bariton, euphonium, trombon, tuba.
**Streingjaljóðføri:** gittar, elgittar og elbass.
**Slagverki:** trummur, xylofon, o.a.
**Sangi:** kór.
**Klaveri og kirkjuorgli.**
**Teori, hoyrilæru og samanspæli.**

### 6.9. Suðuroyar Musikkskúli

Í Suðuroyar Musikkskúla eru 3 ársverk. Lærarartalið er 7 lærarar. Eingin lærari starvast fulla tíð, men 2 lærarar í partíðarstarvi, tilsamans 0,8 ársverki starvast bara í Suðuroyar Musikkskúla.

Tímatalið er 69,5 klokkutímar um vikuna. Næmingatalið er 108 næmingar og samanlagt eru 223 virknisnæmingar.

**Undirvísingarvirksemið í Suðuroyar Musikkskúla**

Undirvíst verður í**:**

**Messingljóðføri:** trompet, cornet, althorn, bariton, euphonium, trombone og tuba.

**Streingjaljóðføri:** gittar, elgittar og elbass.

**Slagverki:** trummur.

**Sangi:** Sangur í skúlaflokkum.

**Klaveri.**

**Teori og hoyrilæru.**

**Samanspæli og orkestri.**

### 6.10. Musikkskúlin á Viðareiði

Í Musikkskúlanum á Viðareiði eru 0,2 ársverk. Lærarartalið er 1 lærari. Eingin lærari starvast hvørki fulla tíð ella bara í Viðareiðis musikkskúla.
Tímatalið er 4 klokkutímar um vikuna. Næmingatalið er 9 næmingar.

**Undirvísingarvirksemið í Musikkskúlanum á Viðareiði**

Undirvíst verður í**:**

**Klaveri** og **blokkfloytu**

### 6.11. Musikkskúlin á Fossánesi

Í Musikkskúlanum á Fossánesi eru 0,2 ársverk. Lærarartalið er 1 lærarar. Eingin lærari starvast hvørki fulla tíð ella bara í Musikkskúlanum á Fossánesi.
Tímatalið er 4 klokkutímar um vikuna. Næmingatalið er 9 næmingar.

**Undirvísingarvirksemi í Musikkskúlanum á Fossánesi**

Undirvíst verður í**: Klaveri**

### 6.12. Fuglafjarðar Musikkskúli

Í Fuglafjarðar Musikkskúla eru 2 ársverk. Lærarartalið er 10 lærarar. Eingin lærari strvast fulla tíð, men ein lærari í parttíðarstarvi, 0,15 ársverki, starvast bara í Fuglafjarðar Musikkskúla.
Tímatalið er 39 klokkutímar um vikuna. Næmingatalið er 94 næmingar og samanlagt eru 117 virknisnæmingar.

**Undirvísingarvirksemið í Fuglafjarðar Musikkskúla**

Undirvíst verður í:
**Strokljóðføri:** violin og viola.
**Træblásara:** tvørfloyta, klarinett og saxofon.
**Messingljóðføri:** trompet, cornet, althorn, valdhorn, bariton, euphonium, trombone og tuba.
**Streingjaljóðføri:** gittar, elgittar og elbass.
**Slagverki:** trummur, xylofon, paukur o.a.
**Klaveri, Samanspæli og orkestri.**

### 6.13. Eysturoyar Tónlistaskúli

Í Eysturoyar Tónlistaskúla eru 2,5 ársverk. Lærarataliđ er 9 lærarar. Eingin lærari starvast hvørki fulla tíð ella bara í Eysturoyar Tónlistaskúla.

Tímataliđ er 51 klokkutímar um vikuna. Næmingataliđ er 102 næmingar og samanlagt eru 130 virknisnæmingar.

**Undirvísingarvirksemi í Eysturoyar Tónlistaskúla**

Undirvíst verður í:
**Strokljóðføri:** violin og viola.
**Træblásara:** tvørfloyta.
**Messingljóðføri:** trompet, cornet, althorn, valdhorn, bariton, euphonium, trombone og tuba.
**Streingjaljóðføri:** gittar, elgittar og elbass.
**Slagverki:** trummur.
**Klaveri og Kirkjuorgli.**
**Samanspæli.**

Í Stranda Musikkskúla eru 1,4 ársverk. Lærarataliđ er 6 lærarar. Eingin lærari starvast hvørki fulla tíð ella bara í Stranda Musikkskúla.

Tímataliđ er 30 klokkutímar um vikuna. Næmingataliđ er 60 næmingar.

**Undirvísingarvirksemið í Stranda Musikkskúla**

Undirvíst verður í:
**Træblásara:** tvørfloyta og klarinett.
**Messingljóðføri:** trompet, althorn, valdhorn, bariton, euphonium, trombon og tuba.
**Streingjaljóðføri:** gittar, elgittar og elbass.
**Slagverki:** trummur.
**Klaveri.**

### 6.14. Yvirlit yvir musikkskúlarnar

Musikkskúlastjórin skipar sambært § 5, stk. 3 í lógini á hvørjum ári tíma- og lærugreinabýtið í musikkskúlaskipanini. Tímarnir verða sum meginregla játtaðir við atliti at barnatali, børn og ung til og við 18 ár, lærarasetanum, ljóðførisbólkum og ferðing hjá lærarum. Yvirlit yvir virksemið í 2025, tímajáttan, umframt næminga- og lærara tal sæst í talvuni niðanfyri.

| Musikkskúli | Tímar | Lærarar | Næm | Virknisnæm | Næmingar 0-18 ár | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tórshavnar | 501,0 | 60 | 828 | 2265 | 5903 | 42,77 |
| Miðnám | 78,0 | 20 | 28 | 78 | | |
| Nes sóknar | 109,5 | 17 | 233 | 368 | 1593 | 11,54 |
| Klaksvíkar | 120,0 | 13 | 224 | 339 | 1359 | 9,85 |
| Vága | 84,5 | 13 | 125 | 170 | 907 | 6,57 |
| Suðuroyar | 69,5 | 7 | 108 | 223 | 711 | 5,15 |
| Eysturkommunu | 51,0 | 9 | 102 | 130 | 639 | 4,63 |
| Norðljómur | 50,5 | 8 | 88 | 137 | 632 | 4,58 |
| Norðurstreymoy | 47,5 | 8 | 86 | 146 | 476 | 3,45 |
| Fuglafjarðar | 39,0 | 10 | 94 | 117 | 413 | 2,99 |
| Stranda | 30,0 | 6 | 60 | 60 | 388 | 2,81 |
| Vágs | 26,5 | 5 | 50 | 64 | 317 | 2,30 |
| Sandoyar | 34,5 | 6 | 47 | 84 | 275 | 1,99 |
| á Fossánesi | 4,0 | 1 | 9 | 9 | 103 | 0,75 |
| Viðareiðis | 4,0 | 1 | 9 | 9 | 87 | 0,63 |
| Tilsamans | 1249,5 | | 2.091 | 4.199 | 13.803 | 100,01 |

## 7. Hølisviðurskifti

Ásett er í § 4, stk. 4 í lógini, at kommunan útvegar musikkskúlanum høli, undirvísingartilfar, amboð og ljóðføri. Musikklærarafelagið hevur víst á, at hølisumstøðurnar kring landið eru sera ymiskar, alt frá trongum, slavnum hølum til nýggjar musikkskúlabygningar, og tí eiga nærri ásetingar at verða gjørdar um, hvat er eitt nøktandi høli. Fyrispurningur er sendur musikkskúlaleiðarunum um hølisviðurskiftini, sí frágreiðingar niðanfyri.

### 7.1. Tórshavnar Musikkskúli

í Havn er nýggjur musikkskúlabygningur við góðum hølisumstøðum.

### 7.2. Musikkskúlin í Vágum

Í Vágum eru høli innrættað til musikkskúlaundirvísing burturav. Undirvíst verður í skúlatíð, og undirvísingartíðirnar eru lagdar í samstarvi við fólkaskúlarnar.

### 7.3. Klaksvíkar Tónlistaskúli

Í Klaksvík verður undirvíst í trimum støðum og hildið verður ikki, at umstøðurnar eru nøktandi.

- Størsti parturin av undirvísingini fer fram í Gamla Skúla eftir skúlatíð. Hølini eru ikki ljóðdoyvd, einki stórt rúm er til orkesturvenjingar. Bygningurin er í 2 hæddum, ovara hæddin er ikki lætt atkomilig hjá rørslutarnaðum.

- Øll hornundirvísingin og nakað av slagverki fer fram á Skúlatrøð, bæði í skúlatíð og eftir skúlatíð. Skúlin hevur tørv á hølum, so musikkskúlin má tillaga, so nógv sum til ber.
- Trummuundirvísingin fer fram á Dávavirkinum, sum liggur langt frá Tónlistaskúlanum. Avgerð er tikin um at undirvísingin skal flyta yvir á Varpið í næstum.

### 7.4. Stranda Musikkskúli

Stranda musikkskúli húsast í Stranda skúla og ræður yvir einari tónleikastovu. Undirvísingin er fyri tað mesta í skúlatíð, men nakrir fáir tímar liggja aftan á síðsta tíma hjá næmingum.

- Stovan er í nýggja skúlanum, hon er stór, ljós og rúmlig og ljóðviðurskiftini eru góð.

- Hon liggur burturfrá hinum floksstovunum í nýggja skúlabygninginum, so tað órógvar ikki floksundirvísingina nakað serligt. Hon liggur beint uppat fimleikarhøllini, har tað hoyrist ímillum, men fimleikatímarnir darvast ikki tað stóra av hesum, av tí at tað er nógvur gangur kortini.
- Vit eru ofta fleiri lærarar til arbeiðis samstundis, og tá má so ein vera í tónleikastovuni og hin/ir finna annað høli. Her brúka vit eina flokksstovu í nýggja skúlabygninginum ella bókasavnið, alt eftir hvat er tøkt. Hetta gongur við góðari vælvild frá skúlaleiðslu og lærarum.
- Av tí at stovan liggur burturfrá, er musikkskúlavirksemið ikki so sjónligt, sum tað var. Áðrenn vit fingu hesa stovuna, høvdu vit eina stovu, sum lá mitt í skúlanum. Vansin við hesum var, at tann stovan lá beint við síðuna av bókasavninum, og bókasavnsvirksemi og trummuundirvísing hóska sera illa saman.

### 7.5. Nes sóknar Musikkskúli

Nes sóknar Musikkskúli er eitt samstarv millum Nes- og Runavíkar kommunu. Undirvíst verður bæði í skúlatíð og eftir skúlatíð.
Á Toftum verður undirvíst í Tónalon, har 3-4 høli eru innrættað til musikkskúlavirksemi. Ljóðviðurskiftini eru góð í trimum av hølunum.

Í Runavík húsast musikkskúlin á politistøðini, har 4 høli burturav eru til tónleikaundirvísing, 3 av teimum eru væl egnað og bøtt er um akustikkin.

### 7.6. Eysturkommunu Tónlistaskúli

Hølisviðurskiftini í Eysturkommunu Tónlistaskúla eru á einari góðari leið.
Eysturkommuna hevur latið 6 høli í gamla barnagarðinum í Gøtugjógv til Tónlistaskúlan. Hetta eru tvey stór undirvísingarhøli, ið verða brúkt til einstaklinga undirvísing, samanspæl og eisini smærri konsertir. Harafturat er eitt minni undirvísingarhøli, eitt uppihaldsrúm og tvey goymslurúm til ljóðføri og annað.

Í bygninginum húsast eisini tveir 7. flokkar, og letur tað til at virka fínt. Tað hoyrist ikki væl ímillum stovurnar, og kommunan hevur játtað at skift nakrar hurðar, sum skulu hjálpa um ljóðviðurskiftini ímillum stovurnar.

Tónleikaundirvísingin er fyri tað mesta í skúlatíð. Hettar kemur av, at Eysturkommunu Tónlistaskúla liggur beint við síðuna av Gøtu skúla, og tískil fungerar tað væl hjá børnunum at renna niðan í Tónlistaskúlan til undirvísing.

Eitt sindur av undirvísing fer eisini fram aftan á skúlatíð, og eru hettar ofta næmingar úr frammhaldsdeildini, sum tá koma til undirvísing.

Í Leirvík er støðan ikki líka góð, tí loftið, sum Tónlistaskúlin hevur nýtt til musikkundirvísing, er brotið niður vegna umbygging í Leirvíkar skúla. Roynt er at finna onnur høli, men tað hevur ikki eydnast, og tískil heldur Tónlistaskúlin nú til í Gøtugjógv, ímeðan umbyggingin fer fram. Teir yngru næmingarnir, 1. og 2. flokkur, koma til Gøtu at fáa undirvísing.

### 7.7. Suðuroyar musikkskúli

Undirvísingin í Suðuroyar Musikkskúla er í skúlunum kring oynna, og hesar umstøður eru ymiskar frá skúla til skúla.

- Í skúlunum í Sumba og Porkeri eru ikki tónleikastovur, og tískil er undirvísingin ávíkavist í handaverk og list stovuni og forhøllini í skúlunum.
- Í Hvalbiar skúla er ein tónleikastova, og so brúkar musikkskúlin eisini bókasavnið í skúlanum at undirvísa í.
- Í høvuðsheitum heldur Suðuroyar musikkskúli til í Tvøroyrar skúla. Har eru tvær skúlastovur og ein lítil kaffistovu, sum musikkskúlin ræður yvir, og so brúkar musikkskúlin eisini tónleikastovuna hjá skúlanum.

Ynskiligt hevði sjálvandi verið, at Suðuroyar musikkskúli hevði ein fysiskan skúla, sum var Suðuroyar Musikkskúli. Góð dømi um hetta eru Tórshavnar Musikkskúli og Vága Musikkskúli.

### 7.8. Fuglafjarðar musikkskúli

Fuglafjarðar musikkskúli húsast í Fuglafjarðar skúla. Barnaskúlin er nýggjur, og har eru góð viðurskifti, men í inniverandi skúlaári (2025 – 2026) eru kortini nakrar avbjóðingar orsakað av, at skúlin, har framhaldsdeildin heldur til, vanliga róptur 64 skúlin, verður umbygdur. Tá ið umbyggingin er liðug, verða umstøðurnar góðar.

Mesta undirvísingin í Fuglafjarðar musikkskúla er eftir skúlatíð, og vit hava nú í mong ár roynt at savna alla undirvísingina ein dag, hósdag, so at lærarar og næmingar hittast, og at kenslan av einum tónleikaumhvørvi verður meira og betri, enn um undirvísingin varð spreidd út yvir alla vikuna.

### 7.9. Norðljómur

- Á Eiði eru 3 einstøk høli millum 12-20 fermetrar. Eitt orkesturhøli ella konserthøll, Kolshøll og køkur til musikklærararnar. Hesi høli verða bara nýtt av musikklærarum, tó er konserthøllin felags við Eiðis skúla og Eiðis kommunu.
- Á Oyrarbakka eru 3 høli, 2 einstøk og køkur á 20 fermetrar umframt eitt trummurúm á 45 fermetrar. Hesi høli eru sett av til musikkskúlan, og sleppa onnur ikki at nýta hølini.
- Orkesturhølið/Aulan, ið er 80 fermetrarar, er felags við skúlan við Streymin, Ungdómshúsið og Eiðis ljómfelag.

### 7.10. Sandoyar musikkskúli

Undirvíst verður í skúlatíð í Skopun, á Sandi og á Meginskúlanum.

- Eitt sera trongligt høli er tøkt í Meginskúlanum, goymslan hjá musikkskúlanum er í sama rúmi, sum undurvíst verður í.
- Á Sandi og í Skopun verður undurvíst í vanligu skúlastovunum.

### 7.11. Musikkskúlin í Vági

Undirvísingin fer fram í hølum í fólkaskúlanum í Vági. Eitt høli er sett av til musikkskúlan burturav, og annars nýtir Vágs musikkskúli eina tónleikastovu saman við fólkaskúlanum, umframt at musikkskúlin kann lána tómar skúlastovur eftir tørvi. Vágs kommuna hevur eina størri ætlan við einum palli, sitiplássi til umleið 200 fólk og við tilhoyrandi umstøðum til ljóð o.l. Har skal musikkskúlin eftir ætlan húsast.

### 7.12. Norðstreymoyar musikkskúli

Í Vestmanna og Kvívík hevur musikkskúlin eingi egin høli yirhøvur. Norðstreymoyar musikkskúli húsast eftir førimuni í fólkaskúlahølum. Tað merkir, at musikkskúlin altíð má víkja, um tvídráttur er um innivist, men oftast ber til at finna eina loysn. Veruleikin er, at musikkskúlin eingi høli hevur, har til ber at seta útgerð og ljóðføri, ella egin høli at undirvísa í. Hetta elvir javnan til avbjóðingar fyri allar partar. Skúlin í Vestmanna verður umbygdur, og tí er ógreitt, um musikkskúlin kann húsast í Vestmanna skúla næstu tvey til trý árini.

### 7.13. Viðareiðis musikkskúli og musikkskúlin á Fossánesi

Í Musikkskúlanum á Fossánesi og í Viðareiðis musikkskúla verður undirvíst í fólkaskúlanum á staðnum, sum hava góðar hølisumstøður.

## 8. Hoyringar og eftirmetingar

Lógin hevur verið í gildi síðani 1. august 2017. Í hesum tíðarskeiði hava avvarðandi partar, sum skipa sítt virksemi sambært lógini, musikkskúlastjórin, kommunalu musikkskúlaleiðararnir, musikkskúlalærarar og kommunurnar gjørt sær ítøkiligar royndir um, hvussu lógin virkar í verki, og um ábøtur eru neyðugar til tess at skipa eina mennandi musikkskúlaundirvísing kring landið.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið er tilskilað, at arbeiðið í sambandi við frágreiðingina eigur umframt at fevna um sjálva lógina og virknaðin av henni eisini at fevna um spurningin um tvíbýtið millum land og kommunu, og um landið skal verða býtt upp í kommunal samstarvsøki. Frágreiðingin skal verða gjørd í samstarvi við Kommunufelagið og aðrar viðkomandi partar, eitt nú Musikkskúlalærarafelag Føroya.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur havt fundir við avvarðandi partar, kommunalu musikkskúlaleiðararnar, musikkskúlastjóran, Kommunufelagið og Musikklærarafelag Føroya. Harumframt hava partarnir latið Barna- og útbúgvingarmálráðnum skrivlig hoyringarskriv, har greitt verður frá teirra hugsan um musikkskúlaskipanina, og hvørjar ábøtur partarnir halda vera neyðugar. Avvarðandi partar hava eisini fingið frágreiðingarnar hjá hvørjum øðrum til kunningar og hava havt møguleika at gera møguligar viðmerkingar. Hoyringarskrivini hjá avvarðandi pørtum eru í høvuðsheitum sett inn í frágreiðingina í teigunum 8.3.- 8.7. Bæði frágreiðingarnar og viðmerkingar hjá pørtunum eru løgd hjá sum fylgiskjøl.

## 8.1. Øki, har partarnir hava gjørt viðmerkingar og tilráðingar

| Evni | Musikkskúla stjórin | Kommunalu leiðararnir | Musikklærara felagið | Kommunu felagið |
|---|---|---|---|---|
| Setanarviðurskifti musikkskúlaleiðarar | X | | X | |
| Musikklærarar ógreið setanarviðurskifti | | | X | |
| Setanarmyndugleiki | X | | X | |
| Ábyrgdarbýtið musikkskúlastjóri og kommunalir musikkskúlaleiðarar | | X | X | X |
| Fyrisitingarliga boðleiðin | X | | | |
| Ráðgevandi nevnd | X | | | X |
| Námsfrøðiligt ráð | X | X | X | |
| Vikuskipan/ árstímatal | | X | | |
| Námsfrøðiligar uppgávur, sum ikki eru undirvísing | | X | | |
| Sáttmáli og sáttmálasamráðingar | | X | X | |
| Musikkskúlaárið | | X | | |
| Avspáking | | X | | |
| Landsumfatandi virksemi | | X | | |
| Førleikakrøv til leiðslur | | X | | |
| Krav um føroyskt mál | | X | | |
| Tíma- og lærugreinabýtið | | X | | |
| Námsætlanir og undirvísingartilfar | | X | | |
| Lønarviðurskifti lærarar | | | X | |
| Hølisviðurskifti | X | | X | |
| Kommunal samstarvsøki | | | X | |
| Samstarv við hægri lærustovnar | | X | | |

Nøkur av økjunum, sum eru merkt við x), eru ikki partur av musikkskúlalógini, onkur eru partur av sáttmálasamráðingum, meðan onnur vísa til skipanir í skúlaverkinum sum námsætlananir, kunnleiki í føroyskum og undirvísingartilfar.

## 8.2. Skrivligar viðmerkingar

- Musikkskúlastjórin
- Kommunufelagið
- Kommunalu musikkskúlaleiðararnir

- Musikklærarafelag Føroya

### 8.3. Musikkskúlastjórin

Yvirskipað heldur musikkskúlastjórin, at skipanin virkar, og at nakrar tillagingar kunnu verða gjørdar, til tess at undirvísingarligi parturin skal virka fullgott.

**Setanarligi bygnaðurin. Tann undirvísingarligi parturin.**
Næsta stig á leiðini til eina fullgóða skipan er, at leiðarin á staðnum verður settur í skipanini á sama hátt sum stjóri og lærarar longu eru. Samanhangur verður soleiðis í fyrisitingarligu boðleiðini millum stjóra, leiðara og lærara, tá ið tað snýr seg um undirvísingarliga partin.

Leiðarin á staðnum eigur framhaldandi at hava allar tær praktisku uppgávur í kommununi, sum skulu tæna kommunu og borgarum í øllum viðurskiftum, sum viðvíkja musikkskúlanum á staðnum.

Setanartilgongdin í sambandi við starvseting av leiðara eigur at verða skipað, sum tá ið leiðarar verða settir í fólkaskúlanum. Uppgávur og skyldur mótvegis kommununi eiga eisini at verða skipaðar sum hjá leiðarum í fólkaskúlunum.

**Fyrsitingarliga boðleiðin**
Um landið framhaldandi skal hava evstu námsfrøðiligu ábyrgdina av undirvísingini, má tann fyristingarliga boðleiðin millum stjóra og lokala leiðara fáast at vera í beinleiðis setanarligum sambandi. Setanin hjá leiðaranum á staðnum kann verða skipað í eina samskipaða starvsetan við áseting um, hvussu nógvir tímar, ið eru til undirvísing, og hvussu nógvir tímar eru til leiðslu.

Í løtuni hava flestu leiðarar eina starvssetan hjá landinum sum lærarar og eina aðra starvssetan aftrat hjá kommununi sum leiðarar. Í summum førum er talan um fulltíðar lærarasetan hjá landinum og aðra hálvtíðarsetan aftrat hjá kommununi. Í øðrum førum er talan um fulltíðarsetan hjá kommunu aftrat einari parttíðar lærarasetan hjá landinum.

**Ábyrgd hjá lokala leiðaranum**
Royndirnar vísa, at verandi milda og óbindindandi orðingin í lógini, sum sigur, at kommunalt setti leiðarin hevur ábyrgd av tí námsfrøðiliga arbeiðinum í skúlanum í samráð við stjóran, er ikki haldgóð. Neyðugt er, at undirvísingarligi bygnaðurin verður skipaður soleiðis at stjóri, lærari og leiðari verða starvssettir sama stað.

Eisini skal viðmerkjast, at førleiki at meta um kravdar útbúgvingar í sambandi við starvseting av leiðarum og lærarum liggur í Undirvísingarstýrinum.

Í verandi lóg hevur lokali leiðarin nøkur rættindi viðvíkjandi undirvísingini uttan at blíva ábyrgdaður, hvørki mótvegis kommunu ella stjóra. Leiðarin hevur so at siga fríar teymar við ongari loyalitetsskyldu. Fyri at fáa undirvísingarliga partin í rættlag, eigur leiðarin á staðnum at verða tikin inn í musikkskúlaskipanina.

**Ráðgevandi nevnd**
Í verandi lóg eru stjóri og allir leiðarar í nevndini. Nevndin hevur verið gagnlig, men leikluturin er liðugur, og nevndin eigur at hava aðra samanseting. Eg hugsi, at leiðarar og stjóri kunnu hittast í øðrum høpi.

**Námsføðiligt ráð**
Lærarar bera javnan fram, at teir hava onga rødd í skúlanum, síðan námsfrøðiligt ráð kom í gildi. Um nakað kann gerast fyri at bøta um tað, eiga vit at gera tað.

## 8.4. Kommunufelagið

Sambært løgtingslóg nr. 83 frá 29. mai 2017 um musikkskúlaskipan (musikkskúlalógin) skal landsstýrismaðurin leggja fyri Løgtingið eina frágreiðing um, hvørt musikkskúlaskipanin virkar eftir ætlan, herundir um broytingar skulu gerast í lógini.

Í hesum sambandi hevur Barna- og útbúgvingarmálaráðið samskipa eitt arbeiði, har umboð fyri ráðið, Musikkskúlastjórin, Kommunufelagið, lokalu musikkskúlaleiðarnir og musikklærarafelagið hava umboðað.

Nógvar áskoðanir eru framkomnar og víst hevur verið til nógvar trupulleikar. Kommunufelagið skal her gera vart við sína hugsan.

Kommunufelagið metir, at musikkskúlaskipanin sum heild hevur virkað eftir ætlan og hevur verið við til at skapa eitt ríkt tónleikalív runt alt landið. Skipanin hevur sínar avbjóðingar, sum allar aðrar skipanir, har ábyrgdarbýtið er deilt millum land og kommunur.

**Fíggingin av skipanini**
Samlaði raksturin av musikkskúlaskipanini var 43 mió. kr. í 2024. Harav rindaði landið 19,4 mió. kr. (45 %) og kommunurnar 23,6 mió. kr. (55 %)

**Musikkskúlaskipanini (2022–2024)**

| | 2022 | 2023 | 2024 |
|---|---|---|---|
| Landið | 17,4 | 17,9 | 19,4 |
| Kommunurnar | 15,0 | 16,1 | 17,1 |
| Tilsamans | 32,4 | 34,0 | 36,5 |
| Kommunalur rakstur | 6,0 | 6,4 | 6,6 |
| Musikkskúlin tilsamans | 38,4 | 40,4 | 43,1 |
| Landið íalt | 17,4 | 17,9 | 19,4 |
| Kommunur íalt | 21,0 | 22,5 | 23,6 |
| Landið í % | 45% | 44% | 45% |
| Kommunurnar í % | 55% | 56% | 55% |

Harumframt gera flest allar kommunur íløgur á økinum. Tl dømis:

- Havnar kommuna hevur brúkt út við 110 mió. kr. síðani 2009
- Sørvágs kommuna 6,3 mió. kr.
- Eiðis kommuna 6,4 mió. kr.

Kommunurnar fíggja sostatt størra partin av musikkskúlaskipanini og eiga tí eisini at hava ábyrgd samsvarandi.

**Ábyrgdarbýtið í skipanini**
Yvirskipaða ábyrgdarbýtið millum land og kommunur, tá ið tað snýr seg um fyrisitingarliga og innihaldsliga partin av musikkskúlanum, er, at landið setur ein musikkskúlastjóra sentralt,

sum sambært lógini hevur yvirskipaðan leiklut í mun til fakligu, námsfrøðiligu, fíggjarligu og samskipandi uppgávuna í allari musikkskúlaskipanini.

Musikkskúlastjórin skal røkja hesa uppgávu í tøttum samstarvi við kommunalu musikkskúlaleiðararnar. Fyri at tryggja samanhangin í skipanini verður ein nevnd sett sambært § 7 í musikkskúla lógini, har allir kommunalu musikkskúlaleiðararnir eru umboðaðir saman við musikkskúlastjóranum, sum er formaður.

Fyri hin einstaka musikkskúlan setir kommunan ein kommunalan musikkskúlaleiðara:

- Kommunali musikkskúlaleiðarin hevur dagligu leiðsluna av musikkskúlanum í kommununi.
- Hann/hon hevur ábyrgd av námsfrøðiliga arbeiðinum í lokala musikkskúlanum og leiðir og fordeilir arbeiðið innanfyri tað lærarabýti, tímabýti og lærugreinabýti, ið musikkskúlastjórin hevur játtað kommunala musikkskúlanum.
- Hann/hon hevur eisini dagliga samskiftið við musikkskúlalærararnar.

Lærarar eru settir sentralt, men hava viðvíkjandi øllum tí dagliga virkseminum tilvísing til kommunala musikkskúlaleiðaran, sum leiðir og fordeilir arbeiðið.

**Møguligar broytingar í skipanini**
Í sambandi við, at landsstýrismaðurin hevur ætlanir um at leggja eina frágreiðing fyri Løgtingið, eru fyrr nevndu partar spurdir eftir teirra hugsan um verandi skipan. Í hesum sambandi er komið fram, at serliga ábyrgdarbýtið millum sentrala leiðaran og lokalu leiðslurnar er ógreitt, og at ábyrgdarbýtið millum land og kommunur sostatt eisini er ógreitt.

Eisini er komið fram, at skipanin viðvíkjandi ráðgevandi nevndini sambært § 7, sum skuldi tryggja samanhangin í skipanini, millum sentralu og lokalu leiðslurnar, ikki hevur virkað í longri tíðarskeið.

Onnur viðurskifti hava eisini verið nevnd, men omanfyri nevndu yvirskipaðu viðurskifti tykjast verða tey, sum skapa størst órógv í skipanini.

Tí er serliga umráðandi at fáa nágreinað neyvari ábyrgdarbýtið millum kommunalu leiðslurnar og sentralt setta musikkskúlastjóran. Kommunufelagið er av tí greiðu fatan, at kommunalt setti leiðarin skal hava dagligu leiðsluna av lokala musikkskúlanum, meðan leikluturin hjá sentrala stjóranum er av yvirskipaðum slag.

Eisini er neyðugt at ráðgevandi nevndin verður endurskipað og virksemið staðfest í praksis.

Myndugleikarnir, í hesum førum BUMR og Kommunufelagið, eiga tí at seta seg saman og nágreina, hvør leikluturin hjá Ráðnum/Musikkskúlastjóranum er, og hvørjar heimildir liggja sentralt, og hvør leikluturin hjá Kommununum/lokalu musikkskúlaleiðaranum skal verða.

### 8.5. Kommunalu musikkskúlaleiðararnir
Í útgangsstøði meta kommunalu musikkskúlaleiðararnir, at musikkskúlalógin frá 2017 er góð. Tó eru nøkur viðurskifti, sum mugu broytast ella tillagast. Nýggja musikkskúlalógin frá 2017 tekur støði í tí praksis, sum var galdandi tá, men samfelagið og musikkskúlaøkið eru fyri stórum broytingum, og tí mugu tillagingar eisini gerast.

**Sáttmálasamráðingar**
Musikkskúlalógin hevur saman við sáttmálanum millum Musikklærarafelag Føroya (MLF) og Fíggjarmálaráðið (FMR) stóra ávirkan á arbeiðið hjá kommunalu musikkskúlaleiðarunum. Í mun til sáttmálasamráðingar millum MLF og FMR er neyðugt at kommunalu musikkskúlaleiðararnir t.d. gjøgnum KAF verða hoyrdir, og at nýggir sáttmálar millum MLF og FMR verða lagdir fyri KAF til góðkenningar, áðrenn hesir fáa gildi.

**Vikuskipan og árstímatal**
Yvirskipað er talan um fleiri viðurskifti, sum, eftir okkara meting, ikki hóska til ein nútíðar musikkskúla. Eitt nú meta vit, at tað er ótíðarhóskandi at halda fast við vikuskipan heldur enn árstímatal. Ein partur av musikkskúlavirkseminum er skipaður øðrvísi, við undirvísing fáar vikur um árið, heldur enn javnt spjatt út á 40 vikur. Ásetingin í sáttmálanum millum MLF og FMR tekur støði í eini musikkskúlaskipan frá 80'unum, og er ikki hóskandi til arbeiði í einum musikkskúla í 2024. Ynskiligt er ikki at fáa eitt fløkt ársverk inn í musikkskúlaskipanina, men heldur eina lagaliga loysn, tó við útgangsstøði í árstímateljing heldur enn vikuteljing.

**Uppgávurnar í einum musikkskúla**
Tørvur er á at áseta og nágreina, hvørjar uppgávur hoyra heima í einum musikkskúla umframt undirvísingina, hvørjar uppgávur eru fyrisitingarligar, og hvørjar eru partar av námsfrøðiliga arbeiðinum. Uppgávur, sum eru námsfrøðiligar uttan at vera undirvísing, er próvdøming, rætting av uppgávum, verkætlanararbeiði, toymisarbeiði, arbeiði við nótum osfr. Umráðandi er, at hesar uppgávur liggja undir námsfrøðiliga arbeiðinum og kunnu lønast við tímum frá landinum. Havast skal í huga, at meginparturin av øllum uppgávum í einum musikkskúla má gerast av útbúnum musikklærarum, og ynski er, at musikkskúlalærarar ikki skulu verða kravdir at hava fleiri starvssetanir hjá landi og kommunu fyri at avgreiða arbeiði, sum hoyrir undir teirra virksemi í musikkskúlunum kring landið.

**Musikkskúlaárið**
Ásetingin um, at musikkskúlaárið fylgir fólkaskúlaárinum, má tillagast, soleiðis at til ber at skilmarka eitt musikkskúlaár, sum gagnar musikkskúlanum, og ikki sum nú, har ein rúgva av tímum fer fyri skeytið, t.d. seinast í juni mánaði. Mælt verður til, at musikkskúlaárið verður ásett sjálvstøðugt, men at hædd verður tikið fyri fólkaskúlaárinum hjá næmingunum. Musikkskúlaárið og fólkaskúlaárið kundu byrja um somu tíð, meðan ein áseting má koma, sum sigur, nær musikkskúlaárið endar. Juni mánaður er sera ódrúgvur, tá umræður musikkskúlavirksemi, og tað er ikki nøktandi at hava undirvísing langt inn í juni mánað, og als ikki sum nú er, tá ið undirvísing er í musikkskúla, aftaná at næmingar í Fólkaskúlunum eru farnir í summarfrí. Umráðandi er, at árliga ásettu tímarnir hjá hvørjum einstøkum lærara verða roknaðir út á tær vikurnar, sum eru í musikkskúlaárinum, soleiðis at tímarnir verða gagnnýttir betri. Niðurskurður (vegna ferðing, undirvísing við fleiri musikkskúlar o.s.fr.) verður roknaður av tímunum hjá hvørjum einstøkum lærara við skúlaársbyrjan. Soleiðis tryggjar man, at sum mest fæst burtur úr játtanini til musikkskúlan.

**Avspáking**
Í mun til ábyrgdarbýtið millum musikkskúlastjóran og kommunalu musikkskúlaleiðararnar er neyðugt at tillaga, soleiðis at ein skipan verður gjørd viðvíkjandi avspáking hjá musikkskúlalærarum, sum kommunalu leiðararnir hava ávirkan á. Mælt verður til, at kommunalu leiðararnir skulu góðkenna "eyka arbeiði", sum kann avspákast, at hædd verður tikin fyri avspáking í mun til setanarbrøk í kommunalu musikkskúlunum, umframt at felags leiðreglur verða gjørdar, sum liggja til grund fyri avgerðum um avspáking.

**Landsumfatandi virksemi**
Undir endamálsorðingini eigur landsdekkandi virksemi at verða nevnt, t.v.s. virksemið tvørtur um kommunumark, og áseting má koma, um hvør ber kostnaðin av tímunum, sum verða brúktir til hetta endamál. Eisini má undirvísing saman við fólkaskúla og undirvísing á hægri stigi setast inn, so samstarvið, sum longu er við t.d. fólkaskúlar, Setrið og hægri lærustovnar uttanlands, rúmast í musikkskúlaskipanini.

**Næmingagjald**
Í mun til fígging er tørvur á eini smidligari áseting, tá ið talan er um gjald fyri frálæru í kommunalu musikkskúlunum, soleiðis at kommunali skúlin kann áseta gjald fyri t.d. styttri skeið o.s.fr., sum kunnu stinga seg upp við stuttum varsli.

**Krøv til leiðarar í smáu musikkskúlunum**
Undir setanir og førleikakrøv er undrunarvert, at eingi krøv eru til leiðarar í smáu musikkskúlunum. Her átti ikki at verið gjørdur munur á stórum og smáum musikkskúlum, tí báðir hava tørv á fakligari leiðslu.

**Lærarasetanir**
Tá ið talan er um at seta musikklærarar, eiga kommunalu musikkskúlaleiðararnir at vera umboðaðir í setanarnevnd. Umframt hetta mugu kommunalu musikkskúlaleiðararnir hava ávirkan á tilgongdina at seta saman starvslýsingar við viðkomandi innihaldi fyri einstøku musikkskúlarnar

**Førleikakrøv til føroyskt**
Næmingarnir eru ofta ungir og hava tørv á, at lærarin skilir føroyskt og sjálvur megnar at málbera seg á føroyskum, soleiðis at næmingarnir skilja hann. Tí eigur føroyskt mál at vera krav í musikkskúlaskipanini.

**Ráðgevandi nevndin**
Tá ið talan er um ráðgevandi nevndina, er støðan tann, at musikkskúlaleiðslurnar í mestan mun eru ein persónur, men tó tveir persónar í størsta musikkskúlanum. Tí verður mett, at orðingin "kommunalu musikkskúlaleiðslurnar" er betri enn "leiðararnir".

**Tíma- og lærugreinabýtið**
Tørvur er hjá kommunalu musikkskúlaleiðarunum at fáa tíma- og lærugreinabýtið fyri komandi árið so tíðliga á várinum sum gjørligt, t.d. 1. mai, so til ber at leggja komandi musikkskúlaárið til rættis. Umframt hetta eigur avspáking vegna ferðing, undirvísing við fleiri skúlar og annað arbeiði, sum verður mett at útloysa avspáking, at verða avgreitt við musikkskúlastjóran og kommunala musikkskúlaleiðaran, soleiðis at niðurskurðurin verður tikin av tímatalinum hjá viðkomandi musikkskúlalærara beinanvegin við skúlaársbyrjan.

**Styttri farloyvi**
Kommunalu leiðslurnar ynskja at avgreiða styttri farloyvi og umskipan á staðnum. Í hesum sambandi er eisini tørvur á eini vikarskipan, sum kann tryggja regluliga undirvísing.

**Námsfrøðiliga ráðið**
Námsfrøðiligt ráð í musikkskúlahøpi hevur annað endamál enn t.d. á fólkaskúlaøkinum ella øðrum skúlum. Flestu musikklærarar arbeiða við fleiri musikkskúlar, og talið á musikklærarum í Føroyum er avmarkað. Tí verður mett skilabetri at hava eitt námsfrøðiligt ráð fyri allar musikkskúlalærarar í føroysku musikkskúlaskipanini, soleiðis at musikkskúlalærarar kunnu

samskifta og leggja til rættis námsfrøðiliga saman sum hópur, heldur enn at hava fleiri námsfrøðilig ráð at fyrihalda seg til. Soleiðis kann yrkisførleiki hjá musikkskúlalærarum haldast við líka, umframt at nýggj átøk og hugskot kunnu vendast millum musikkskúlalærarar á sama høvuðsfaki, hóast hesi ikki arbeiða í sama musikkskúla.

**Samanumtøka**
Musikkskúlin hevur ongar ásetingar um námsætlanir, og hetta ger tað eisini trupult at fáa skipan í lag við at fáa til vega føroyskt undirvísingartilfar. Tí verður mælt til, at krav um námsætlanir kemur inn í musikkskúlalógina, og at Nám fær til uppgávu at gera undirvísingartilfar til musikkskúlan. Samanumtikið eru musikkskúlaleiðararnir fegnir um, at nýggja musikkskúlalógin sá dagsins ljós í 2017, tí táverandi musikkskúlalóg frá 1984 var als ikki nøktandi og tók støði í eini heilt aðrari tíð. Sáttmálin millum MLF og FMR ber enn brá av musikkskúlanum í 80'unum, og tí er eisini neyðugt, fyri at fáa økið at virka í dagsins samfelagi, at gera grundleggjandi tillagingar í sáttmálanum millum MLF og FMR. Hesi seinastu 7 árini síðani nýggja musikkskúlalógin kom í gildi, er samfelagið nógv broytt, og tí mugu tillagingar eisini gerast í musikkskúlalógini samsvarandi. Hetta arbeiði vilja musikkskúlaleiðararnir fegnir verða partur av, og vit bjóða okkum fram at geva okkara íkast til arbeiðið.

Kommunalu musikkskúlaleiðararnir hava í hoyringini lagt hetta afturat sínum hoyringarsvari

**Játtanin hjá kommunalu musikkskúlunum**
Kommunalu musikkskúlaleiðararnir mæla til, at áseting verður gjørd um, hvussu løgtingsjáttanin kann býtast út í kommunalu musikkskúlarnar. Tað hevði verið skilagott um ein pulja t.d. ein % partur av undirvísingartímum hevði verið lagdur til kommunalu musikkskúlarnar at ráða yvir. Eisini manglar ein áseting í mun til fígging av landsdekkandi virksemi, konsertferðum uttanlands o.ø.

**Samstarv við hægri lærustovnar**
Í § 2 manglar ein áseting um samstarv við hægri lærustovnar sum t.d. Setrið og hægri lærustovnar uttanlands. Slík samstørv eru í skipanini í dag, men hettar eigur at nágreinast í lógini á sama hátt sum orgulleikaraútbúgvingin og musikkskúlamiðnámsútbúgvingin.

## 8.6. Musikklærarafelag Føroya
Musikklærarafelagið hevur bæði á fundi og í hoyringarskrivi víst á, at musikkskúlaskipanin sum heild hevur virkað væl. Skipanin gevur øllum somu møguleikar at fáa undirvísing í tónleiki frá væl útbúnum lærarum. Tað er stórur áhugi fyri tónleikaundirvísing kring landið. Undirvísingarstøðið er høgt, og felagið fegnast um, at stórur meiriluti av lærarunum hava eina útbúgving svarandi til ein kandidat ella hægri. Fleiri av hesum lærarum hava sínar røtur beinleiðis úr musikkskúlaskipanina.

Musikkskúlaskipanin hevur ein fjølbroyttan lærarahóp, ið kann bjóða tónleikaundirvísing í breiðum høpi. Í løtuni kann ein fáa undirvísing í alskins ljóðførum, sangi, tónleikaástøði, tónleikasøgu o.s.fr. Hetta sæst beinleiðis aftur í tónleikalívinum í Føroyum, har vit í dag hava gleði av einum sera fjølbroyttum tónleikalívi í øllum tónleikasløgum.

Hóast ein kann koma við nógvum jaligum viðmerkingum til musikkskúlaskipanina, eru nakrar ábøtur alneyðugar. Musikklærarafelag Føroya vil heita á landsmyndugleikan at fremja hesar broytingar í musikkskúlalógini:

**Starvsetanin hjá kommunalu musikkskúlaleiðarunum eigur at verða flutt til musikkskúlaskipanina**

Avbjóðingar stinga seg upp í musikkskúlaskipanini, tí musikkskúlaleiðararnir arbeiða ikki undir sama stovni sum stjórin og lærararnir. Hóast tað er positivt, at lógin staðfestir m.a. virki hjá musikkskúlastjóranum og kommunalu leiðarunum, eru lærararnir eftirlatnir, tvíbýttir millum landsmyndugleikan sum arbeiðsgevara, og samstundis at arbeiða undir einum kommunalum leiðara.

Um álvarsligar ósemjur stinga seg upp millum ein lærara og ein kommunalan musikkskúlaleiðara, kann lærarin venda sær til musikkskúlastjóran. Musikkskúlastjórin hevur tá ongar heimildir mótvegis kommunala musikkskúlaleiðaranum, og kann reelt ikki gera nakað við ósemjuna, hóast musikkskúlastjórin gevur læraranum viðhald. Hetta førir við sær, at lærarar kunnu skjótt koma i eina keðiliga støðu. Tað kann tykist sum um, at tað er sjálvboðið hjá kommunala musikkskúlaleiðaranum, um viðkomandi vil gera nakað við ósemjuna ella ikki.

Tílíkar støður skapa sera stóra frustratión millum lærarar. Lærararnir sita oftani eftir við kensluni av, at tú hvørki verður virdur ella hoyrdur í musikkskúlaskipanini, og hetta elvir til, at nógvir lærarar mistrívast á ávísum arbeiðsplássum.

Ein onnur avbjóðing í musikkskúlaskipanini er, at teir kommunalu musikkskúlaleiðararnir seta seg í mongum førum sum mótpartar mótvegis musikkskúlastjóranum. Musikkskúlastjórin hevur yvirskipaðu fakligu, námsfrøðiligu, figgjarligu og samskipandi uppgávuna fyri alla musikkundirvísing, men hesum velja musikkskúlaleiðarar at síggja burtur frá.

Musikkskúlaleiðararnir hava skipað seg í sínum egna felagi, og hava tikið sær rætt at leggja seg út í lønarviðurskiftini hjá lærarum og átaka sær tann samskipandi leiklutin. Hetta máar støðið undan arbeiðinum hjá musikkskúlastjóranum og endamálinum við ráðgevandi nevndini.

Tað er alneyðugt, at musikkskúlaskipanin verður vird, og at lønarviðurskiftini hjá lærarum eisini verða vird og skipað soleiðis, at arbeiðið kann fara fram á øllum musikkskúlum kring landið.

Musikkskúlaskipanin hevur tørv á, at stjórin, leiðsla og lærarar arbeiða undir sama stovni. Musikklærarafelagið mælir til at flyta setanina hjá leiðaranum í kommununi til landið, har setanin hjá leiðaranum er í musikkskúlaskipanini. Hetta hevði tryggjað eitt natúrligt hierarki millum stjóran, leiðaran og lærararnar. Á henda hátt varðveitir man ta smidligu skipanina, har lærarar kunnu arbeiða á fleiri musikkskúlum. Musikkskúlaleiðararnir kunnu framhaldandi røkja tey kommunalu áhugamálini og hava somu uppgávur sum áður. Musikkskúlastjórin setir og loysir úr starvi musikkskúlalærarar og musikkskúlaleiðarar.

**Skipa lærararáð á teimum størru musikkskúlunum, heldur enn eitt námsfrøðiligt ráð.**

Lógin gevur ikki lærarunum rúmd at kunna gera sína ávirkan galdandi á arbeiðsplássinum. Til tess at fremja trivnað og bestu fakligu gróðrarlíkindi er neyðugt, at lærararnir kenna samognarskap og vera tiknir við upp á ráð. Lærararnir hava tørv á einum veruligum forum til fría viðgerð av alskyns málum, ístaðin fyri skipan í størru skúlunum við námsfrøðiligum ráði, har leiðsla skúlans hevur formansskapin og er sett til at leiða fundirnar.

Trupulleikin við núverandi skipan við námsfrøðiligum ráði er, at musikkskúlaleiðarin stendur við ábyrgdini at koma við málum at viðgera. Musikkskúlaleiðarin hevur dagliga aðrar uppgávur enn at undirvísa, tí verða evnini til viðgerðar sera avmarkað og oftani óviðkomandi fyri lærararnar.

Ein betri loysn fyri musikkskúlaskipanina hevði verið at skipa lærararáð við tilmælisrætti og ummælisrætti á teimum størru skúlunum. Lærararnir skipa seg sjálvir og leiða fundirnar. Eitt tílíkt ráð kann viðgera og ráðgeva leiðsluni í málum av námsfrøðiligum áhuga. Hetta hevði styrkt samognarkensluna hjá lærarunum og eggja lærararnar at hava regluligt orðaskifti um námsfrøðilig viðurskifti.

Ein kann venda sær til skipanina hjá miðnámsskúlum til íblástur, har lærararáð er skipað á teimum størru útbúgvingarstovnum.

**§ 4, stk. 4: "...Hóskandi hølir..." eigur at vera meira nágreinað**.
Lógin áleggur kommunum at veita hóskandi hølir til musikkskúlarnar. Hóast at nakrar kommunur hava raðfest at veita musikkskúlunum góð høli, eru tað framvegis fleiri musikkskúlar, har hølisumstøðurnar eru ov vánaligar. Á summum arbeiðsplássum arbeiða musikkskúlalærarar í køldum loftsrúmum, slavnum kjallarum ella í óvaskaðum hølum, sum als ikki eru hóskandi til tónleikaundirvísing.

Musikklærarafelagið mælir til at nágreina, hvat eitt hóskandi høli er. Viðurskifti sum t.d. hiti, reingerð, góð ljóðviðurskifti, goymslupláss til ljóðføri og undirvísingaramboð, og at hølini skulu vera tøk alt skúlaárið, eigur at vera eitt krav.

## 9. Niðurstøður og tilmæli

Sambært hoyringunum og umrøðu á felags fundum, so eru partarnir samdir um, at vit hava ein góðan musikkskúla við væl útbúnum og virknum lærarum, ið flestu allir hava eina útbúgving svarandi við eina kandidatútbúgving ella hægri. Áhugin fyri tónleikaundirvísing kring landið er stórur, og mett verður, at musikkskúlaskipanin sum heild hevur virkað væl við atliti at skipa fjølbroytt virksemi í ljóðføri, sangi, samanspæli og kóri.

Tað eru tó viðurskifti, sum partarnir halda ikki eru nøktandi, og sum krevja ábøtur, har serliga er nomið við tey øki, ið eru umrødd niðanfyri í 9.1. til 9.5. Partarnir eru tó ikki á einum máli í øllum viðurskiftum, serliga tá ið umræður setanarviðurskifti, har tað eru kommunurnar, ið seta kommunalu musikkskúlaleiðararnar, og landið setur musikkskúlastjóran, sum setur lærararnar.

### 9.1. Setanarviðurskifti
Bæði á felags fundum og í hoyringarskrivunum hava musikkskúlastjórin og Musikklærarafelag Føroya víst á, at setanarviðurskiftini eiga at verða endurskoðað. Musikkskúlastjórin vísir á, at hann onga heimild hevur viðvíkjandi kommunalu leiðarunum, sum skulu leiða tað virksemi, sum musikkskúlastjórin játtar kommununum. Kommunan er setanarmyndugleiki hjá kommunalu leiðarunum, og musikkskúlastjórin er ikki partur av setanartilgongd ella teirra leiðsluviðurskiftum. Kommunalu leiðararnir hava í flestu førum tvær starvssetanir, eina sum musikkskúlaleiðari hjá kommununi og eina sum musikkskúlalærari hjá landinum. Landið hevur onga ávirkan á setanarpartin hjá kommununum.

Musikklærararnir kenna seg í einari tvístøðu setanarliga. Landið ella rættari musikkskúlastjórin er teirra setanarmyndugleiki, men í dagliga virkseminum vísa teir til kommunala leiðaran. Tá ið starvslig viðurskifti taka seg upp, so venda teir sær til sín setanarmyndugleika, men setanarmyndugleikin hevur onga heimild yvir kommunala leiðaranum. Víst varð á, at henda skipan skapar ónøgd og mistrivnað millum lærararnar.

Musikkskúlastjórin og musikkskúlalærararnir mæla til, at allir partar, musikkskúlastjórin, kommunalu musikkskúlaleiðararnir og lærararnir vísa til sama setanarmyndugleika. Musikkskúlastjórin mælir til at nýta somu skipan sum í fólkaskúlanum.

Kommunalu musikkskúlaleiðararnir eru ikki samdir í hesum, men mæla til at nágreina yvirskipaðu uppgávurnar í mun til dagligu uppgávurnar, soleiðis at eingin ivi er um, hvør hevur ábyrgd av hvørjum. Greiðar leiðreglur eiga at at verða gjørdar um ábyrgdarbýtið, og eisini við atliti at musikkskúlalærarum, so tey vita, hvar og hvønn tey skulu venda sær til í ávísum spurningum.

Kommunalu musikkskúlaleiðararnir vísa í hesum sambandi á, at í fólkaskúlanum eru tað lokalu leiðararnir, sum seta lærararnar, og tað ger, at javnvágin millum land og kommunala ávirkan javnvigar. Kommunalu leiðararnir halda ikki, at partarnir eru samdir um hesa skipan, og vísa á, at tað neyvan ber til bara at taka nøkur fet mótvegis eini skipan í fólkaskúlanum, uttan at taka heildina við.

Kommunalu leiðararnir hava ikki víst ónøgd við, at teir eru settir kommunalt, men hava gjørt vart við fleiri starvsviðurskifti í samskipanini millum kommunala leiðaran og musikkskúlastjóran. Kommunalu leiðararnir kenna ikki, at teir í nóg stóran mun verða tiknir við upp á ráð viðvíkjandi lærarasetanum, starvslýsingum, avspáking hjá lærarum og tíma- og lærugreinabýtinum.

Kommunalu leiðararnir eru ikki samdir í, at musikkskúlastjórin skal vera partur av setanartilgongd og leiðsluviðurskiftunum hjá kommunalu leiðarunum og vísa á, at talan er um eina tvíbýtta skipan.

Kommunufelagið vísir á, at tað er sera umráðandi at fáa lýst nærri ábyrgdarbýtið millum kommunalu leiðararnar og musikkskúlastjóran. Kommunufelagið heldur, at kommunali leiðarin eigur at hava dagligu leiðsluna av virkseminum á staðnum, og at musikkskúlastjórin skal hava yvirskipaðar uppgávur.

**Tilmæli 1**

**Mælt verður til:**

- at gera eina greiðari lýsing av ábyrgdarbýtinum millum kommunala leiðaran og musikkskúlastjóran, har greitt verður tilskilað í lógini, at samstarvið gongur báðar vegir.
- at taka støðu til, um tað skal verða ein setanarmyndugleiki í musikkskúlaskipanini
- at eitt starvsbýtið verður gjørt millum musikkskúlastjóran og kommunala musikkskúlaleiðaran, sum greitt tilskilar, hvar lærarar skulu venda sær í starvsrættarligum spurningum.

### 9.2. Fígging og ábyrgdarbýtið millum land og kommunur

Býtið millum land og kommunur kann verða ein avbjóðing, um ásetingar og mannagongdirnar ikki eru greiðar. Tað, ið serliga ger seg galdandi í musikkskúlaskipanini, er fígging og ábyrgdarbýtið millum land og kommunu viðvíkjandi tímajáttan, leiðslu og lærarasetanum.

Sum skipanin er, so fíggja kommunur og land umleið hvør sína helvt av undirvísingarvirkseminum í musikkskúlaskipanini, tá ið rakstur hjá kommununum og inntøkur av næmingagjaldi eru íroknað. Kommunurnar rinda harumframt høli, útgerð, løn hjá kommunala leiðaranum og møguliga øðrum kommunalum starvsfólki, sum eru knýtt at musikkskúlanum. Landið rindar flutningsútreiðslur hjá lærarum, sum undirvísa í fleiri musikkskúlum.

Landið tillutar einstaka musikkskúlanum tímar í mun til talið av børnum frá 0-18 ár í kommununi ella kommunala samstarvinum um musikkskúlan. Harumframt verður eisini atliti tikið atøðrum iðurskiftum sum lærarasetanum, ferðing og ljóðførisbólkum. Tímarnir verða ikki játtaðir sum ein samlað pulja hjá kommunala leiðaranum at ráða yvir og taka støðu til, men verða játtaðir til ítøkiliga tónleikavirksemi, sum er í einstaka musikkskúlanum.

Kommunalu musikkskúlaleiðararnir hava víst á, at ein grundupphædd átti at verið játtað til einstaka musikkskúlan at ráða yvir, áðrenn tímajáttanin verður býtt út á ljóðføri og onnur undirvísingarevni.

Leiðsluliga er eisini eitt tvíbýti. Musikkskúlastjórin tillutar tímar til alt virksemi í kommunala musikkskúlanum og setur lærararnar. Síðani tekur kommunali musikkskúlaleiðarin yvir og skipar virksemið á staðnum, og hevur dagligu ábyrgdina av lærarum skúlans. Setanarliga er eingin samskipan millum musikkskúlastjóran og kommunalu leiðararnar, sum hava hvør sín setanarmyndugleika, ávikavist land og kommunu.

Sambindingarliðið millum musikkskúlastjóran og kommunalu musikkskúlaleiðararnar er ráðgevandi nevndin, sum ikki hevur virkað eftir ætlan seinastu árini. Ásett í eisini í § 5, stk. 5 í lógini, at musikkskúlastjórin setur lærarar í samráð við avvarðandi musikkskúlaleiðara. Harumframt er ásett í § 2, stk. 3 í kunngerð um musikkskúlastjóran, at hann skipar í samráð við lokalu musikkskúlaleiðararnar fyri lærarabýti, tímabýti og lærugreinabýti skúlanna millum fyri hvørt skúlaár, og í § 4 í kunngerðini um kommunala musikkskúlaleiðaran, at kommunali musikkskúlaleiðarin og musikkskúlastjórin eiga at vera í regluligum og skipaðum samskifti og samstarvi. Lóg og kunngerðir áleggja í stóran mun musikkskúlastjóranum samstarvspartin, sum eisini er viðkomandi, men her átti ein regulering at verið gjørd, so báðir partar hava samstarvsábyrgd.

Avleiðingar av býtinum er eisini, at lærararnir eru undir tveimum myndugleikum, í dagliga starvinum undir kommunala myndugleikanum, og setanarliga eru teir undir landinum.

Roynt varð í broyttu lógini frá 2017 at gera hesi viðurskifti greiðari, men úrslitið er meira ein staðfesting av tveimum myndugleikum innan musikkskúlaskipanina bæði leiðsluliga og fíggjarliga. Tørvur er á at fáa eina betri samskipan millum partarnar og eina liðiligari skipan millum ábyrgdarbýtið hjá landi og kommunum. Lógin eigur at hava greiðari ásetingar um, at báðir partar hava ábyrgd av samskifti og samstarvi.

Neyðugt verður at nágreina, hvussu samstarvið skal verða, hvør hevur ábyrgd av hvørjum øki í musikkskúlanum, og hvat liggur í orðinum "yvirskipað ábyrgd" og "daglig ábyrgd".

**Tilmæli 2**

**Mælt verður til**:
- at taka støðu til, um broytingar skulu gerast í fíggjarliga býtinum millum land og kommunu
- at greina og taka støðu til, um broytingar skulu gerast í ábyrgdarbýtinum millum land og kommunu

## 9.3. Ráðgevandi nevndin

Ráðgevandi nevndin er ætlað sum bindilið millum musikkskúlastjóran og kommunalu musikkskúlaleiðararnar. Nevndin skal vera musikkskúlastjóranum til hjálpar at samskipa musikkundirvísingina; ein skipan, har musikkskúlastjórin kann leita sær ráð, hjálp og sparring í sínum arbeiði, og har musikkskúlaleiðararnir bæði kunnu fáa ráðgeving og nærri innlit í skipanina.

Uppgávan hjá ráðgevandi nevndini er sambært kunngerðini at umrøða mál, ið viðvíkja musikkskúlaskipanini, so sum samstarv og samskifti millum musikkskúlar, fíggjarætlan, tímabýti og samanseting av undirvísingartilboði.

Sum víst á bæði í hoyringarskrivum og á fundum, so hevur ráðgevandi nevndin ikki virkað nøktandi seinastu árini, og eingin fundur hevur verið í meira enn tvey ár.

Sum er, er ráðgevandi nevndin óvirkin og tí ikki ein skipan, sum mennir musikkskúlavirksemið, er ikki nýskapandi og hjálpir ikki til í ráðleggingartilgongdum innan musikkskúlaskipanina. Neyðugt verður tí at endurskoða verandi skipan ella finna aðra samstarvsskipan millum musikkskúlastjóran og kommunalu musikkskúlaleiðararnar.

**Tilmæli 3**

**Mælt verður til:**
- at greina, hví ráðgevandi nevndin ikki virkar
- at kanna møguleikan at endurskipa nevndina og gera leiðreglur fyri, hvussu nevndin skal virka sum sambindingarlið og ráðgevandi skipan, herímillum um nevndin samstundis í ávísum málum sum setanum kundi havt tilmælandi leiklut.
- At taka støðu til, um nýggj samstarvsskipan er neyðug

## 9.4. Námsfrøðiliga ráðið

Námsfrøðilig ráð verða skipað í einstaka musikkskúlanum og eru ætlað sum eitt stað, har lærararnir kunnu ráðgeva kommunala musikkskúlaleiðaranum. Tað kann í summum førum vera trupult at fáa skipanina at virka, av tí at fleiri lærarar ikki hava ein musikkskúla sum sítt undirvísingarstað, men undirvísa í fleiri musikkskúlum. Spurningurin er tí í hvørjum námsfrøðiligum ráði, teir skulu luttaka.

Musikklærarafelagið vísir á, at lærarar verða ikki í nóg stóran mun tiknir við upp á ráð viðvíkjandi virkseminum í musikkskúlanum. Til tess at fremja trivnað og bestu fakligu gróðrarlíkindi er neyðugt, at lærararnir kenna samognarskap og vera tiknir við upp á ráð.

Musikklærarafelagið heldur, at um eitt námsfrøðiligt ráð ella eitt lærararáð skal skipast á ein skynsaman hátt, so er tað neyðugt, at tann námsfrøðiliga ábyrgdin liggur hjá tí myndugleika, har lærararnir eru settir, og at boðlinjan millum stjóra, leiðara og lærara er greið.

Musikklærarafelagið sigur, at lærararnir ynskja heldur eitt stað, møguliga eitt lærararáð, har teir kunnu viðgera undirvísingarlig evni. Lærararnir halda, at tað er alneyðugt, at eitt lærararáð er knýtt at einum ávísum musikkskúla. Umstøðurnar og lærarabýtið í teimum ymsu musikkskúlunum hava sera stóra ávirkan á, hvat virksemi kann fara fram á staðnum. Hetta má eitt lærararáð fyrihalda seg til. Eitt lærararáð má fyrst og fremst styrkja lokala virksemið.

Kommunalu musikkskúlaleiðararnir vísa á, at tað er ymiskt frá musikkskúla til musikkskúla, hvussu námsfrøðiligir fundir verða hildnir, men eru ikki samdir í, at musikkskúlalærarar ikki hava ávirkan á viðgerðina. Musikkskúlalærarar hava til námsfrøðiligar fundir altíð møguleika at seta mál á skrá, leggja fram til kunning, umrøðu og viðgerð. Tað eru musikkskúlalærararnir, sum viðgera evni og koma til niðurstøður saman við leiðsluni á staðnum.

Kommunalu musikkskúlaleiðararnir mæla til at skipa eitt felags námsfrøðiligt ráð, sum er fyri allar musikkskúlalærarar, har møguleiki verður at skipa smærri bólkar, sum kunnu arbeiða við ítøkiligum námsfrøðiligum evnum.

**Tilmæli 4**

**Mælt verður til:**

- at lýsa skipanina við námsfrøðiligum ráðum í musikkskúlaskipanini
- at lýsa fleiri møguleikar fyri samstarvsskipan millum leiðslu og lærarar
- at skipa eitt forum, har lærararnir kenna, at teir hava ávirkan og kunnu umrøða viðkomandi námsfrøðilig og faklig viðurskifti.

### 9.5. Hølisumstøður

Musikklærarafelagið vísir á, at hølisumstøðurnar eru ymiskar kring landið. Í nøkrum musikkskúlum eru nýggj góð høli, men so eru tað eisini musikkskúlar, har arbeiðsumstøðurnar als ikki eru nøktandi. Undirvíst verður í køldum loftsrúmum, slavnum kjallarum ella óvaskaðum hølum.

Fyrispurningur er sendur øllum kommunalu musikkskúlaleiðarunum um, hvussu hølisumstøðurnar eru í musikkskúlunum kring landið. Svarini frá musikkskúlaleiðarunum eru umrødd í kap. 7.

Hølisviðurskifti spæla ein stóran leiklut í undirvísingini bæði hjá lærarum og næmingum og hava ávirkan á bæði læring og trivnað. Tað er umráðandi at umstøðurnar eru nøktandi, og at skipað verður so fyri, at grundleggjandi viðurskifti eru í lagi sum hiti, reingerð, ljóðviðurskifti, goymslupláss, og at hølini eru tøk til undirvísingina.

**Tilmæli 5**

**Mælt verður til**:

- at eitt minsta mark verður sett fyri høli til tónleikaundirvísing í musikkskúlanum
- at heimild verður ásett sambært § 4, stk. 4 í lógini um at áseta meginreglur um krøv til hølisviðurskifti í musikkskúlanum.